# *Á rættari kós*

**B Ú S K A P A R F R Á G R E I Ð I N G  I**

mars 2012

Fíggjarmálaráðið

Fyrivarni verður tikið fyri villum.

Búskaparfrágreiðing I, mars 2012

© 2012, Fíggjarmálaráðið
Uppseting: Fíggjarmálaráðið
Útgávan kann takast niður frá www.fmr.fo.

# INNIHALDSYVIRLIT

1. FORMÆLI LANDSSTÝRISMANSINS ..... 5
2. INNGANGUR ..... 7
3. ALTJÓÐA BÚSKAPURIN ..... 9
4. FØROYSKI BÚSKAPURIN ..... 11
4.1 Konjunkturgongdin ..... 11
4.2 Arbeiðsloysið ..... 12
4.3 Føroyska vinnan ..... 13
4.4 Føroysku húsarhaldini ..... 14
4.5 Tað almenna ..... 15
4.6 Gjalds- og handilsjavni ..... 16
4.7 Útlit fyri føroyska búskapin ..... 16
4.8 Avbjóðingar fyri føroyska búskapin ..... 17
5. KARMAFORTREYTIR ..... 19
5.1 Høvuðsfortreytin við uppskotinum til játtanarkarmar 2013-2017 ..... 19
5.2 Fortreytir fyri útreiðsluframskrivingunum 2013-2017 ..... 19
5.3 Fortreytir fyri inntøkuframskrivingunum 2013-2017 ..... 19
6. FRAMSKRIVINGAR ..... 21
7. TILTØK 2013-2017 ..... 23
8. LØGUR 2012-2017 ..... 25
9. ÚRSLIT 2013-2017 ..... 27
APPENDIKS 1: FRAMSKRIVINGAR ..... 29
APPENDIKS 2: RAKSTRAR- OG INNTØKUTILTØK 2013-2017 ..... 43
APPENDIKS 3: LØGUR 2013-2024 ..... 77

# 1. FORMÆLI LANDSSTÝRISMANSINS

Sambært høvuðsniðurstøðuni í várfrágreiðingini 2012 hjá Búskaparráðnum er fremsta avbjóðingin fyri føroyska búskapin at skapa vøkstur, sum kann venda fólkafráflytingini og minka almenna hallið. Høvuðsniðurstøðan hjá Búskaparráðnum samsvarar sostatt við politikkin hjá hesi samgonguni.

Fyri at skapa vøkstur er m.a. ásett í samgonguskjalinum, at ein nýggj flatskattaskipan verður sett í verk, soleiðis at tað altíð skal loysa seg at arbeiða.

Størsta avbjóðingin hjá hesi samgonguni verður at fáa tamarhald á almenna búskapinum. Samgongan er samd um, at hallið skal minkast, soleiðis at avlop verður aftur á fíggjarlógini í 2016.

Til tess at fáa avlop aftur á fíggjarlógina í 2016 skulu stórar nýskipanir fremjast í almenna bygnaðinum komandi 5 árini. Hetta er galdandi fyri bæði inntøku- og útreiðslusíðu. Harumframt er eisini neyðugt við rationaliseringum og samanleggingum í almenna geiranum. Neyðugt er at fáa sum mest fyri hvørja skattakrónu.

Atfinningarnar frá Løgtinginum seinastu árini, um at ov stórar partur av tiltøkunum í uppskotunum til játtanarkarmar hava verið ógreinað, eru tiknar til eftirtektar. Landsstýrið hevur í fyriliggjandi uppskoti til játtanarkarmar útgreinað tiltøk og nýskipanir fyri árini 2013-2017.

Í uppskotinum til játtanarkarmar hevur landsstýrið uppskot um heilsunýskipan og skúlanýskipan. Eisini skal pensjónsnýskipanin setast í verk. Hesar nýskipanir eru neyðugar fyri at framtíðartryggja okkum høgt tænastustøði fyri lægri kostnað. Eisini skal gerast fiskivinnunýskipan, sum gevur vinnuni tryggari og varandi karmar og sum eisini gevur landskassanum fleiri inntøkur.

Nakra raðfestingar eru gjørdar fyri fíggjarárið 2013. Høvuðsraðfestingarnar fara til útbúgvingarøkið og almannaøkið, við fleiri nýggjum røktarheimum og heimum til fólk við serligum tørvi, umframt at rúm er gjørt fyri fleiri næmingum á miðnámi.

Fyri at tryggja virksemi, hevur landsstýrið valt at hava hægri løgukarm, sum næstu árini verður áleið 300 mió. kr. árliga. Hóast valt er framhaldandi at útbyggja infrakervið, vil landsstýrið næstu 4 árini brúka yvir 60% av løgukarminum til almanna-, heilsu- og skúlaøkið. Hetta er bygging av bygningum, t.v.s. mest virksemisskapandi løgur.

Fyri at skapa fortreytir fyri vøkstri í føroyska búskapinum var nýggj flatskattaskipan longu sett í gildi 1. januar í ár. Nýggja flatskattaskipanin, við lægri marginalskatti, fer at skapa umstøður fyri, at væl skikkað arbeiðsmegi fer at búleikast í Føroyum. Tað leggur lunnar undir nýggjar vinnur í føroyska samfelagnum. Hetta nevnir Búskaparráðið eisini í í várfrágreiðingini 2012:

*"Nakrar tænastufyritøkur veita tænastur, sum krevja serligar førleikar av starvsfólkunum, og rinda tí løn, sum liggur yvir miðal sammett við aðrar fyritøkur. Talan kann vera um fyritøkur, sum veita tænastur til útflutnings, meðan aðrar veita tænastur heima í kapping við útlendskar fyritøkur. Tílíkar fyritøkur kunnu fáa styrkt sítt kappingarføri um føroyska arbeiðsmegi sammett við útlendskar fyritøkur, tá ið skatturin av arbeiði lækkar. Tí kann møguleiki eisini vera fyri øktari framleiðslu í hesum vinnum, sum tó kann væntast at taka tíð, tí at økt framleiðsla helst krevur fyrireiking."*

Onnur viðurskifti, sum hava stóran týdning fyri at fáa fólk at støðast í Føroyum, og fyri at fáa føroyingar at flyta heimaftur til Føroyar, eru útbúgvingar- og bústaðaviðurskiftini. Her eru eisini glottar fyri framman. Spakin verður skjótt settur í til nýggja miðnámsskúlan í Marknagili, ið er størsta byggiverkætlan í Føroyum í nýggjari tíð, og fyri at gera bústaðamarknaðin meira fjøltáttaðan, fekk Húsalánsgrunnurin fyri stuttari tíð síðan víðkaðar heimildir at virka undir.

Við broytingunum, sum landsstýrið hevur lagt í uppskotið um játtanarkarmar, verður yvirskot á fíggjarlógini fyri 2016.

Hóast tamarhald er fingið á landskassahallinum og vøkstur er staðfestur í búskapinum, so eru enn stór tøk eftir at taka.

**Jørgen Niclasen**
landsstýrismaður

# 2. INNGANGUR

Sambært § 8, stk. 2 í løgtingslóg nr. 42 frá 4. mai 2009 um landsins játtanarskipan skal ein frágreiðing (Búskaparfrágreiðing I), sum lýsir og metir um búskaparstøðu Føroya, herímillum tann almenna geiran, leggjast við uppskotinum til løgtingssamtykt, sum fevnir um ein samlaðan játtanarkarm fyri fíggjarlógina næsta ár, býtt á greinar. Uppskotið til løgtingssamtykt skal leggjast fram fyri 1. apríl.

Henda skipanin við at læsa fastan játtanarkarmin fyri komandi árið við einari løgtingssamtykt á vári árið fyri, hevur nú verið roynd í tvey ár. Hetta er sostatt triðja uppskotið til játtanarkarmar, ið verður lagt fram. Í undanfarnu uppskotunum hevur Løgtingið funnist at, at ov stórur partur av tiltøkunum hava verið ógreinað. At tiltøk eru ógreinað merkir, at tey enn ikki eru politiskt samtykt. Atfinningarnar eru tiknar til eftirtektar. Tiltøkini at røkka ásettu kørmunum eru nú ítøkilig og útgreinað.

Frágreiðingin er sett saman soleiðis, at fyrst er ein stutt lýsing av gongdini í altjóða búskapinum og gongdini í ymiskum viðurskiftum, sum hava týdning fyri gongdina í føroyska búskapinum. Hesin parturin av frágreiðingini er fyri stóran part tikin burtur úr várfrágreiðingunum hjá Búskaparráðnum og Landsbanka Føroya. Gongdin og útlitini fyri føroyska búskapin verða annars lýst við tí vitan og teimum tølum, ið vóru tøk í mars 2012. Tikið verður samanum høvuðsboðskapin hjá Búskaparráðnum, og hvussu henda samgongan ætlar at loysa stóru avbjóðingarnar fyri føroyska búskapin í løtuni.

Hereftir eru fortreytirnar fyri játtanarkørmunum lýstar. Síðani er lýsingar av framskrivingum og tiltøkunum frá 2013-2017 og langtíðarløguætlanini frá 2013 til 2024. At enda verður úrslitið (RLÚ) 2013-2017 útgreinað.

Framskrivingarnar, tiltøkini og langtíðarløguætlanin eru annars meira útgreinað í appendiks.

# 3. ALTJÓÐA BÚSKAPURIN

Vøksturin í heimsbúskapinum minkaði munandi síðsta hálva árið 2011, og var sostatt lægri enn væntað frammanundan. Stígur er serliga í framkomnum ídnaðarlondum, men vøksturin er eisini lækkaður í menningarlondum. Metingar benda á, at lítil ella eingin vøkstur var í USA og Evropa í øðrum hálvári 2011.

**Talva 3.1: Árligur vøkstur í BTÚ í føstum prísum í %, 2010-2013**

| *prosent* | **2010** | **2011** | **2012** | **2013** |
|---|---|---|---|---|
| Heimsbúskapurin | 5,2 | 3,8 | 3,3 | 3,9 |
| Ídnaðarlond | 3,2 | 1,6 | 1,2 | 1,9 |
| Menningarlond | 7,3 | 6,2 | 5,4 | 5,9 |

*Kelda: IMF, World Economic Outlook Uppdate, 24 january 2012.*

Metingar benda á lítlan vøkstur í ídnaðarlondum næstu tvey árini á umleið 1-2% um árið í føstum prísum. Vøksturin í heimsbúskapinum verður sambært flestu metingum mest sannlíkt 3-4% í føstum prísum næstu tvey árini. Lyklatøl úr USA og aðrastaðni, sum eru almannakunngjørd í januar mánaði í ár, benda kortini á, at vøksturin í løtuni er hægri, enn væntað varð frammanundan.

Arbeiðsloysið er framvegis sera høgt í nógvum ídnaðarlondum, 8-9% í USA og Stóra Bretlandi og umleið 23% í Spania og umleið 18% í Grikkalandi. Høga arbeiðsloysið sæst m.a. aftur í privata eftirspurninginum, sum er lágur í løtuni, og hugurin at gera íløgur er eisini undir miðal. Aðrar orsøkir eru eisini til gongdina í altjóða búskapinum í løtuni. Vøksturin í heimsbúskapinum í 2010 kom lutvíst av, at fyritøkur í framleiðsluvinnum vuksu um goymslurnar. Tað var ikki væntandi, at henda gongd skuldi vara við leingi.

Nógvur ótryggleiki var á altjóða fíggjarmarknaðum seinna hálvár 2011. Ótryggleikin byrjaði við, at semja í síðstu løtu fekst í lag um at hækka skuldarloftið hjá stjórnini í USA. Amerikanska skuldarmetingin varð síðani lækkað á sumri 2011 av eini av størru metingarfyritøkunum í heiminum, Standard & Poor’s. Somuleiðis hevur tað órógvað íleggjarar og fíggjarmarknaðir, at tað hevur verið so trupult hjá ES-londum at finna loysnir til evropeisku skuldarkreppuna og at taka neyðugar avgerðir. Hetta hevði m.a. við sær, at renturnar á ríkislánsbrøvum í Suðurevropa hækkaðu sera nógv.

Kreppan í Evropa breiddi seg eisini til størri lond, sum vanliga eru sera høgt í metum millum íleggjarar, m.a. til Spania, Italia og Belgia. Eisini Frakland merkti í minni mun hækkandi rentumun sammett við týsk ríkislánsbrøv.

Skuldarkreppan og ótryggleikin ávirkaði eisini fíggjarstovnar í Evropa. Atgongdin hjá evropeiskum fíggjarstovnum at fíggja seg á peningamarknaðinum versnaði munandi miðskeiðis í 2011. Ábendingar eru um, at fíggjarstovnar táttaðu útlánspolitikkin av somu orsøk. Heimsins stóru miðbankar hava tí samskipað stórar hjálparpakkar, sum hava veitt fíggjarstovnum neyðugt gjaldføri.

M.a. hevur Evropeiski miðbankin, og danski tjóðbankin, givið fíggjarstovnum atgongd til trý ára gjaldførislán móti trygd í útlánum við ávísari dygd.

At enda varð heimsbúskapurin ávirkaður av hækkandi oljuprísum og jarðskjálvtanum í Japan. Eitt skifti fyrsta ársfjórðing 2011 var oljuprísurin t.d. hækkaður 25% sammett við ársbyrjan 2011. Ídnaðarframleiðsla kring allan heimin varð órógvað sera nógv av jarðskjálvtanum í Japan. Metingar benda t.d. á, at framleiðslan av bilum í heiminum minkaði umleið 30% teir báðar fyrstu mánaðirnar eftir jarðskjálvtan í Japan.

Yvirhøvur eru útlitini fyri heimsbúskapin næstu tvey árini framvegis óviss. Gongdin er m.a. treytað av, hvørt tað eydnast londunum í ES og øðrum ídnaðarlondum at fáa tamarhald á skuldarkreppuni. Bygnaðarbroytingar og tillagingar í fíggjarpolitikkinum, m.a. við herdum regluverki og meira samskipan av fíggjarpolitikkinum millum lond, eru neyðugar, skulu íleggjarar og fíggjarmarknaðir aftur fáa álit á rikna búskapar- og fíggjarpolitikkin.

Útlit eru til, at verandi metlága rentustøðið verður varandi næstu 2 árini. Aðrar óvissur eru, at nógv skuld hjá fíggjarfyritøkum og ríkisskuld í Suðurevropa fellur til gjaldingar í 2012 og skal endurfíggjast. Enn er óvist hvussu hetta fer at ávirka fíggarmarknaðir og fíggingarviðurskifti yvirhøvur.

Fíggjarpolitikkurin verður táttaður í fleiri størri londum í Evropa í 2012 og 2013, m.a. í Stóra Bretlandi, Týsklandi, Italia og Spania. Harafturat er óvissa um fíggjarpolitikkin í USA næstu tvey árini, og forsetaval verða í Fraklandi og USA seinni í ár. Politiska skipanin í USA er framvegis grundleggjandi ósamd um rikna politikkin. Ósemja er t.d. um, hvørt skatta- og inntøkuhækkingar ella útreiðslusparingar eru rætta amboðið at minka almenna hallið. Eydnast ikki at semjast um grundleggjandi viðurskifti í rikna fíggjarpolitikkinum, verða stórar lógarkravdar sparingar og skattahækkingar settar í verk í USA seint í 2012 og í 2013.

# 4. FØROYSKI BÚSKAPURIN

## 4.1 Konjunkturgongdin

Tað hava verið stór sveiggj í føroyska búskapinum seinastu árini. Frá 2005 til 2008 var stór framgongd í so at siga øllum vinnugreinum, men so vendi gongdin brádliga til eina ógvusliga afturgongd. Eftir stuttari tíð fór føroyski búskapurin frá bráðvøkstri til eina djúpa afturgongd, sum rakti botnin í 2009. Síðan tá hevur gingið spakuliga framá aftur í føroyska búskapinum. Hetta sæst best aftur í samlaðu lønargjaldingunum[1], sí talvu 4.1.

**Talva 4.1: Lønargjaldingar í mió. kr. býttar á høvuðsvinnur, 2008-2011**

| | | | | | Munur 2010-2011 | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| *mió. kr.* | **2008** | **2009** | **2010** | **2011** | **í mió. kr.** | **prosent** |
| Fiskivinna o.o. ráevnisvinna | 1.242 | 1.096 | 1.250 | 1.286 | 36 | 2,9 |
| Byggivinna o.o. tilvirking | 1.012 | 878 | 821 | 826 | 4 | 0,5 |
| Privatar tænastuvinnur | 2.423 | 2.288 | 2.244 | 2.221 | -23 | -1,0 |
| Almennar tænastur | 2.341 | 2.440 | 2.486 | 2.524 | 38 | 1,5 |
| **Samlaðu lønargjaldingarnar** | **7.018** | **6.701** | **6.801** | **6.856** | **55** | **0,8** |

*Kelda: Hagstova Føroya.*

Í 2011 vóru goldnar 6.856 mió. kr. í lønum, og var hetta 55 mió. kr. ella 0,8% meira enn í 2010. Hetta var annað árið á rað við vøkstri í samlaðu lønargjaldingunum, men lønargjaldingarnar komu tó ikki upp á sama støði sum í 2008, tá ið samlaðu lønargjaldingarnar vóru góðar 7 mia. kr.

Árið í ár hevur eisini fingið eina góða byrjan, tá ið tað snýr seg um lønargjaldingar. Í januar og februar í ár vóru tilsamans goldnar 1.075 mió. kr. í lønum. Hetta er 5,4% meira enn somu tíð í fjør, sí talvu 4.2. Høvuðsorsøkin er framgongdin í fiski-, ali- og aðrari ráevnisvinnu, har lønargjaldingarnar vóru góð 23% hægri enn somu tíð í fjør.

Framgongd hevur eisini verið í lønargjaldingunum í privatu tænastuvinnunum og byggivinnuni higartil í ár samanborið við somu tíð í fjør. Orsøkin til at lønargjaldingarnar fyri almennar tænastur minkaðu var pedagogverkfallið í februar í ár. Minkingin var 11 mió. kr. ella 2,6%.

[1] Føroysku lønargjaldingarnar eru omanfyri 50% av BTÚ og tí geva lønargjaldingarnar eina góða ábending um gongdina í virkseminum í føroyska búskapinum.

**Talva 4.2: Lønargjaldingar í mió. kr. býttar á høvuðsvinnur, januar-februar**

| | | | | | Munur 2011-2012 | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| *mió. kr.* | **2008** | **2009** | **2010** | **2011** | **í mió. kr.** | **prosent** |
| Fiskivinna o.o. ráevnisvinna | 162 | 174 | 155 | 191 | 36 | 23,2 |
| Byggivinna o.o. tilvirking | 139 | 122 | 124 | 128 | 4 | 3,4 |
| Privatar tænastuvinnur | 358 | 341 | 339 | 364 | 25 | 7,5 |
| Almennar tænastur | 392 | 394 | 403 | 392 | -11 | -2,6 |
| **Samlaðu lønargjaldingarnar** | **1.051** | **1.031** | **1.020** | **1.075** | **55** | **5,4** |

*Kelda: Hagstova Føroya.*

## 4.2 Arbeiðsloysið

Arbeiðsloysið var vaksandi gjøgnum alt 2009 og fyrstu mánaðirnar av 2010. Í mai 2010 minkaði arbeiðsloysið fyri fyrstu ferð síðan november 2008. Eftir húsagangin hjá Fiskavirking hækkaði arbeiðsloysið við árslok 2010 og var í hæddini í februar 2011, tá ið tað var 7,9%. Síðan lækkaði arbeiðsloysið aftur frá februar 2011 til september 2011, tá ið tað aftur byrjaði at vaksa. Í februar í ár var arbeiðsloysið 6,6%.

**Mynd 4.1: Føroyska arbeiðsloysisprosentið, januar 2010 til februar 2012.**




*Kelda: Hagstova Føroya.*

### 4.3 Føroyska vinnan

Føroyska vinnan kann býtast upp í vinnur, sum fyri mesta partin fáast við útflutning, og vinnur, sum fyri mesta partin liva av heimliga eftirspurninginum. Vinnurnar, ið umboða útflutningssíðuna í føroyska búskapinum, eru í høvuðsheitinum fiskivinnan og aðrar tilfeingis- og ídnaðarvinnur. Vinnurnar, ið liva av heimliga eftirspurninginum, eru í høvuðsheitinum vinnur, ið fáast við handils-, tænastu- og byggivirksemi.

Føroyska fiskivinnan kann býtast upp í botnfiskaveiði undir Føroyum, botnfiskaveiði á fjarleiðum, fiskiveiði eftir uppisjóvarfiski og alivinnu, sum allar virka undir ymsum fortreytum til ymsar tíðir.

**Botnfiskaveiðan undir Føroyum** er yvirhøvur merkt av vánaligum fiskiskapi. Frá januar til november 2011 vóru avreiddu nøgdirnar av botnfiski 26% lægri enn somu tíð árið fyri, men prísirnir vóru yvirhøvur betri í 2011 enn í 2010.

Viðvíkjandi **botnfiskaveiðini á fjarleiðum** eru útlit fyri, at framleiðslan í hesum partinum av flotanum veksur nakað í 2012 og 2013 samanborið við 2011. Samlaðu føroysku toska- og hýsu-kvoturnar í russiskum sjógvi eru 27% hægri í 2012 samanborið við 2011, og útlit eru fyri støðugum prísum á framleiddu vørunum. Eingin fiskiskapur verður hjá føroyskum skipum í norskum sjógvi í ár.

Framleiðslan í **uppisjóvarvinnuni** verður allarhelst tann sama í ár sum í 2011, ið var eitt gott ár hjá hesum partinum av flotanum. Makrelfiskiskapurin á sumri 2011 var eitt gott ískoyti hjá fleiri skipum. Ósemjan um makrelfiskiskapin merkir harafturímóti, at tað er óvist, hvussu strandalondini fara at umsita makrelfiskiskapin frameftir.

Útlit eru fyri, at avlopið og útflutningsvirðið í **alivinnuni** lækkar nakað í 2012 samanborið við 2011, sum var eitt gott ár hjá alivinnuni. Tøkan verður mest sannlíkt støðug næstu 2-3 árini. Tøkan var umleið 60 tús. tons í 2011 og verður mett til áleið tað sama í 2012. Prísirnir á alifiski lækkaðu miðskeiðis í 2011 og eru nú nakrar fáar krónur yvir framleiðslukostnaðin, sum er um 21 kr./kg. í miðal. Nakað av óvissu eru um prísgongdina, men prísirnir kunnu falla meira triðja og fjórða ársfjórðing 2012. Harafturat eru vaksandi trupulleikar av laksalús. Í ringasta føri kann framleiðslu-kostnaðurin hækka munandi av hesum. Útflutningsvirðið av alifiski var 1,6 mia. kr. í 2011 og verður allarhelst nakað lægri í 2012.

Samanumtikið verður samlaða framleiðslan í fiskivinnunum allarhelst nakað minni í 2012 enn í 2011. Høgi oljuprísurin tyngir munandi um raksturin og vaksandi oljuprísir eru ein hóttan, sum kann fáa munandi ávirkan á úrslitið hjá øllum flotanum. Sambært forsøgnum um oljuprísin, fer hann allarhelst at hækka frameftir.

Við hesum fyrivarnum koma fiskivinnurnar allarhelst at geva eitt minni ískoyti til BTÚ í 2012 enn í 2011. Tó verður mett, at framleiðslan í fiskivinnuni á landi verður á leið tann sama í 2012 sum í 2011, møguliga eitt vet hægri, og talið av løntakarum fer væntandi at vera áleið tað sama sum í 2011. Stórar broytingar hava verið í fiskavirkisvinnuni seinastu árini. Síðan 2003 er arbeiðsmegin fallin við meira enn einum helmingi. Rávørugrundarlagið hevur verið víkjandi seinastu árini, og samlaða botnfiskaveiðan við Føroyar hevur ikki verið lægri síðan fyrru helvt av 1990-árunum.

Av heimligu vinnunum er **byggivinnan** tann vinnugreinin, sum hevur sveiggjað mest tey seinastu árini. Sera nógv virksemið var í byggivinnuni í 2008, áðrenn tað byrjaði at ganga afturá í føroyska

búskapinum. Afturgongdin rakti byggivinnuna sera meint. Virksemið í byggivinnuni er nógv minkað seinastu 3 árini. Lønargjaldingarnar í byggivinnuni eru minkaðar 24% síðan á sumri 2008, samstundis sum talið av løntakarum er minkað 28%.

Byggivinnan kann býtast upp í byggifyritøkur, sum serliga fáast við størri byggiverkætlanir, og smærri fyritøkur, sum serliga fáast við húsasmíð og aðrar smærri byggiverkætlanir.

Tað er serliga ódnarveðrið í vetur og frítøkan fyri meirvirðisgjald av bygging og umvæling av egnum bústaði, sum hava ávirka virksemið hjá smærri handverkarafyritøkum innan byggivinnuna seinasta hálvárið. Ódnarveðrið gjørdi skaða nógvastaðni í landinum, og hetta hevur skapt nakað av virksemið hjá smærri handverkarafyritøkunum. Lógin, sum frítekur lønir til bygging og umvæling av egnum bústaði, fór úr gildi 1. januar í ár. Fólk hava tí skunda sær at bygt og gjørt umvælingar, áðrenn lógin fór úr gildi. Tað hevur skapt fitt av virksemið hjá handverkarum í byggivinnuni at fáa hesi arbeiði frá hondini og úr ordrabókunum, áðrenn 1 januar 2012[2].

Av størri verkætlanum kunnu nevnast fleiri almennar verkætlanir, t.d. terminalur við flogvøllin, miðnámsskúli í Marknagili, útbyggingar av vatnorkuni hjá SEV og Leirvíkarvegurin.

Heimligu **handils- og tænastuvinnurnar** merkja framvegis lága eftirspurningin eftir vørum og tænastum. Tað er serliga sølan av drúgvum nýtsluvørum og ymsum tænastuveitingum, sum er væl minni nú enn fyri nøkrum árum síðan. Sølan av ódrúgvum nýtsluvørum er ikki minkað eins nógv. Seinastu innflutningstølini benda tó á, at innflutningurin av drúgvum nýtsluvørum veksur aftur.

Sermerkt fyri fleiri av tænastuvinnunum er, at kostnaðurin av at seta á stovn nýggja fyritøku er lágur, og tískil eru forðingarnar fyri at koma inn á marknaðin ikki eins stórar sum t.d. í fiskivinnuni. Nakrar tænastufyritøkur veita tænastur, sum krevja serligar førleikar av starvsfólkunum, og rinda tí løn, sum liggur yvir miðal sammett við aðrar fyritøkur. Talan kann vera um fyritøkur, sum veita tænastur til útflutnings, meðan aðrar veita tænastur heima í kapping við útlendskar fyritøkur. Tílíkar fyritøkur kunnu fáa styrkt sítt kappingarføri um føroyska arbeiðsmegi sammett við útlendskar fyritøkur, tá ið skatturin av arbeiði lækkar. Tí kann møguleiki vera fyri øktari framleiðslu í hesum vinnum, sum tó kann væntast at taka tíð, tí at økt framleiðsla helst krevur fyrireiking.

Stórar broytingar hava verið í **føroyska fíggjargeiranum** seinastu árini. Eik samtakið fór á húsagang á heysti 2010, og endurstovnaði Eik-bankin er givin við virkseminum uttanlands. BankNordik hevur harafturímóti økt um virksemið uttanlands. Størsti parturin av kundunum hjá BankNordik eru nú í Danmark.

Mett verður ikki, at nøkur kredittklemma eyðkennir føroyska fíggjargeiran í løtuni. Eftirspurningurin eftir fígging er harafturímóti lítil. Hetta tyngir raksturin og leggur trýst á vinningin hjá bankunum. Herd solvenskrøv til bankarnar kunnu møguliga darva útlánsvøksturin í nærmastu framtíð.

### 4.4 Føroysku húsarhaldini

Yvir helmingurin av allari nýtslu í Føroyum stavar frá húsarhaldunum. Tí hevur eftirspurningurin hjá húsarhaldunum nógv at týða fyri virksemið hjá vinnunum, ið liva av heimliga eftirspurningin-

[2] Hetta sæst aftur í treystitalinum hjá byggivinnuni í føroyska konjunkturbarometrinum. Treystitalið hjá føroysku byggivinnuni fór úr -32 í januar 2011 upp í 27 í juni 2011 og er nú fallið niður á aftur -32.

um. Nýtsluatferðin hjá húsarhaldunum er nógv ávirkað av ymiskum signalum og hendingum í samfelagnum.

Tað eru fleiri viðurskifti, sum hava ávirkað nýtsluatferðina hjá føroysku brúkarunum skeiva vegin seinastu árini. Nevnast kunnu t.d. alheims fíggjar- og skuldarkreppan, víkjandi fiskastovnar, høgir oljuprísir og húsagangirnir hjá Eik og Fiskavirking. Slíkar hendingar gera privatu húsarhaldini ótrygg, og tey velja at minka um nýtsluna og økja um uppsparingina ella gjalda skuld niður. Nýtslan hjá føroysku húsarhaldunum er minkað lutfalsliga nógv frá heystinum 2007 til várið 2010.

Nýggja flatskattaskipanin gevur í ár føroysku húsarhaldunum umleið 260 mió. kr. meira í lummarnar. Hvussu húsarhaldini velja at raðfesta hesar pengar millum nýtslu og uppsparing hongur neyvt saman við framtíðarvónunum hjá føroysku húsarhaldunum.

## 4.5 Tað almenna

Samlaða almenna hallið var í 2008 umleið 7% av BTÚ og í ár verður tað væntandi umleið 4% av BTÚ. Hallið stavar serliga frá landskassanum og kommununum, sí talvu 4.3, sum hava havt hall síðan 2007. Síðan 2010 hava útgjøldini úr ALS eisini verið størri enn inngjøldini.

**Talva 4.3: Úrslit í almenna geiranum, 2007-2012**

| *mió. kr.* | **2007** | **2008** | **2009** | **2010** | **2011** | **2012** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Landið | 1.443 | -630 | -688 | -581 | -400 | -365 |
| Kommunur | -103 | -347 | -141 | 24 | -53 | -74 |
| ALS | 94 | 56 | 22 | -112 | -159 | -121 |
| AMEG | 102 | 98 | 120 | 94 | 65 | 83 |
| **Almenni geirin tilsamans** | **1.535** | **-822** | **-688** | **-575** | **-548** | **-477** |

*Kelda: Fíggjarmálaráðið og Landsbanki Føroya.*

Hallið á fíggjarlógini hevur økt um skuld landskassans. Mett verður, at samlaða bruttoskuld landskassans verður umleið 5,8 mia. kr. við árslok 2012. Samlaða ognin verður mett at verða umleið 5,5 mia. kr. Sostatt fer nettoskuld landskassans at verða umleið 300 mió. kr. við árslok 2012.

Samanlagt var hallið hjá føroysku kommununum 24 mió. kr. í 2010 og 53 mió. kr. í 2011. Í ár verður samlaða hallið hjá føroysku kommununum 74 mió. kr. Samlaða bruttoskuldin hjá kommununum er umleið 1 mia. kr. við árslok 2011.

Eginognin hjá ALS var 440 mió. kr. ultimo 2011. Við verandi arbeiðsloysi verða útgoldnar umleið 25 mió. kr. í arbeiðsloysisstuðli um mánaðin. Arbeiðsloysið fer væntandi at minka sum árið líður, og tí verður samlaða útgjaldið í ár mett til umleið 275 mió. kr. Inngjaldið var 140 mió. kr. í 2011 og við hækkaða inngjaldinum verður mett, at inngjaldið verður umleið 163 mió. kr. í 2012.

Soleiðis sum búskaparligu útlitini eru næstu árini, verður samlaða almenna skuldin størri enn ognin við árslok 2013. Samanborið við okkara grannalond er almenni geirin tó lutfalsliga væl fyri. Almenni geirin í Føroyum hevur t.d. lægri nettoskuld enn almenni geirin í Danmark. Av 31 OECD londum vóru tað í 2011 bert 5 lond, ið høvdu almenna netto ogn, tey vóru Noreg, Finnland, Korea, Estland og Svøríki.

## 4.6 Gjalds- og handilsjavni

Føroyski gjaldsjavnin er ein uppgerð av øllum flytingum millum Føroyar og útheimin. Seinastu tvey árini hevur avlop verið á føroyska gjaldsjavnanum. Í 2010 var gjaldsjavnaavlopið 761 mió. kr., sí mynd 4.2[3], og í 2011 verður gjaldsjavnaavlopið mett til umleið 500 mió. kr.

**Mynd 4.2: Føroyska gjaldsjavnaúrslitið, 1998-2010**




*Kelda: Hagstova Føroya.*

Gjaldsjavnin verður vanliga býttur upp í tænastu- og handilsjavna umframt ymsar inntøkuflytingar. Tað er serliga útflutningurin av ali- og uppisjóvarfiski og minkandi vøruinnflutningurin síðan 2008, ið hevur økt um handilsjavnaavlopið seinastu árini. Inntøkuflytingarnar eru ríkisveitingin úr Danmark umframt lønir og inntøkur og útreiðslur av fíggjarognum. Í 2010 var avkastið av fíggjarognum -182 mió. kr., meðan lønarflytingarnar vóru 648 mió. kr.

At Føroyar í løtuni hava stórt gjaldsjavnaavlop og stórt landskassahall bendir á, at privatu íløgurnar í Føroyum eru á heldur lágum støði og sostatt endar stórur partur av føroysku uppsparingini uttanlands. Íløgur eru ein fyritreyt fyri vøkstri, og tí kann verandi uppsparingar- og íløgumynstur darva framtíðar vøkstri í føroyska samfelagnum.

## 4.7 Útlit fyri føroyska búskapin

Sambært nýggjastu uppgerðini hjá Hagstovuni var vøksturin í BTÚ 3,3% í 2010, samstundis sum miðalprísvøksturin var 0,4%. Fyri 2011 verður BTÚ framroknað at vaksa 2,4% við einum

[3] Nýggjasta gjaldsjavnauppgerðin frá Hagstovuni er fyri 2010.

miðalprísvøkstri á 2,3%. Í føstum prísum er føroyski búskapurin sostatt vaksin í 2010, meðan hann hevur staðið í stað í 2011. Búskaparráðið og Landsbankin meta, at útlit eru fyri lágum vøkstri í BTÚ í 2012 og 2013 á millum 2 og 3% í árligum prísum, hetta svarar til áleið 1% í føstum prísum.

## 4.8 Avbjóðingar fyri føroyska búskapin

Sambært Búskaparráðnum er ein av heilt stóru avbjóðingunum í føroyskum búskapi at skapa vøkstur, sum kann venda fólkafráflytingini. Hetta kann eitt nú gerast við vakstrarfremjandi tiltøkum, sum eitt nú at nýskipa fiskivinnuna og at gera fleiri íløgur í útbúgving. Samstundis er neyðugt at koma við einari ítøkiligari ætlan fyri, hvussu javnvág fæst millum almennu inntøkurnar og útreiðslurnar.

Fólkatalið í Føroyum er í løtuni minkandi, fyrst og fremst orsakað av, at tilflytingin er minkað síðstu árini, meðan fráflytingin hevur verið meira støðug. Fremstu orsøkirnar til at fólk flyta av landinum eru betri lestrar- og arbeiðsmøguleikar í grannalondunum. At hesi fólkini ikki venda heimaftur er við at gerast ein stórur trupulleiki í føroyska samfelagnum. Hetta sæst serliga aftur í aldursbólkunum 20-35 ár, sum eru smáir í Føroyum. Hesir aldursbólkarnir eru minkaðir meira enn aðrir aldursbólkar síðstu 20 árini.

Yvirskipaða tilmæli til fíggjarpolitikkin er at halda áfram við at tillaga fíggjarpolitikkin og at minka almenna hallið eftir nøkrum árum. Tiltøkini, sum eru framd síðani 2009 fyri at minka hallið, hava gjørt lítið við grundleggjandi orsøkirnar til almenna hallið og við trýstið, sum er á almennu útreiðslurnar. Harafturat er lítið gjørt fyri at skapa fortreytir fyri hægri búskaparvøkstri.

# 5. KARMAFORTREYTIR

## 5.1 Høvuðsfortreytin við uppskotinum til játtanarkarmar 2013-2017

Fyri at skapa fortreytir fyri vøkstri í føroyska samfelagsbúskapinum hevur Løgtingið longu samtykt munandi skattalættar í inntøkuskattinum við nýggju flatskattaskipanini. Høvuðsfortreytin fyri uppskotinum til játtanarkarmar 2013-2017 er ásetingin í samgonguskjalinum, at samlaðu útreiðslurnar í samtyktu játtanarkørmunum fyri 2012-2016 skulu haldast. Sambært játtanarkørmunum 2012-2016, ið Løgtingið samtykti í mai í fjør, minkar landskassahallið eftir 5 árum, soleiðis at avlop er aftur á fíggjarlógini í 2016, sí talvu 5.1.

**Talva 5.1: Úrslit í samtyktu játtanarkørmunum 2012-2016**

| *Mió. kr.* | **2012** | **2013** | **2014** | **2015** | **2016** |
|---|---|---|---|---|---|
| **RLÚ-úrslit** | **-444,9** | **-335,0** | **-185,0** | **-40,00** | **110,0** |

*Viðm.: 2012-tølini eru fíggjarlógartøl, uttan møguligar eykajáttanir.*

## 5.2 Fortreytir fyri útreiðsluframskrivingunum 2013-2017

Útreiðslukarmarnir fyri árini 2013-2017 taka sostatt støði í 5 ára útreiðslukørmunum, sum Løgtingið samtykti í mai í fjør. Býti millum einstøku greinarnar er tó broytt samsvarandi gjørdum broytingum í málsøkjabýtinum. FAS endurgjaldið er t.d. broytt frá at vera ein útreiðsla undir § 3 til at vera ein lækking av skattainntøkunum undir § 20.

Útreiðslukarmarnir 2013-2017 eru framskrivaðir í 2013 prísum. Tað merkir í hesum førum, at atlit eru ikki tikin fyri møguligum lønar- og prísbroytingum eftir 2013. Talan er sostatt um sokallaðar mongdarframskrivingar frá 2013-2017, sum í høvuðsheitinum eru grundaðar á fólkatal og fólkasamanseting, t.d. mettu gongdina í talinum av skúlanæmingum og pensjónistum frá 2013 til 2017. Tó er hædd tikin fyri metingunum hjá heilsuverkinum, at fleiri sjúklingar fara at flyta yvir til dýrari viðgerð og heilivág næstu árini, umframt bundnu raðfestingunum til ellis- og røktarheim.

## 5.3 Fortreytir fyri inntøkuframskrivingunum 2013-2017

Inntøkurnar í karmauppskotinum 2012-2017 eru framskrivaðar við støði í søguligum inntøkutølum og teimum kendu fortreytum í løtuni. Vanligur landsskattur og meirvirðisgjald umboða umleið 65% av samlaðu inntøkum landskassans. Landsskatturin og meirvirðisgjaldið hava tí stóran týdning fyri inntøkugongdina hjá landskassanum.

Í 1997 vóru landsskattainntøkurnar umleið 790 mió. kr. og í 2010 vóru landsskattainntøkurnar umleið 1,5 mia. kr. Hetta gevur ein árligan miðalvøkstur í landsskattainntøkunum í leypandi prísum á 5,1% tey 13 árini frá 1997 til 2010[4]. Sama tíðarskeið hevur árligi miðalvøksturin í meirvirðisgjaldsinntøkunum í leypandi prísum verið 5,3%. Meirvirðisgjaldsinntøkur landskassans vóru 600 mió. kr. í 1997 og umleið 1,2 mia. kr. í 2010, sí talvu 5.2. Samanlagt var árligi miðalvøksturin í

[4] Fyri árini frá 1997 til 2010 eru tøk roknskapartøl, sum eru samanbærilig.

inntøkum landskassans 2,8% frá 1997 til 2010[5]. Samlaðu inntøkur landskassans vóru umleið 2,9 mia. kr. í 1997 og góðar 4,1 mia. kr. í 2010.

**Talva 5.2: Árligur miðalvøkstur í inntøkum landskassans frá 1997 til 2010**

| *mió. kr.* | **1997** | **2010** | **Árligur vøkstur** |
|---|---|---|---|
| Landsskattur | 789.544 | 1.506.366 | 5,1% |
| Meirvirðisgjald | 600.521 | 1.182.288 | 5,3% |
| Aðrar skatta- og avgjaldsinntøkur | 599.905 | 819.442 | 2,4% |
| **Skattir og avgjøld tilsamans** | **1.989.970** | **3.508.096** | **4,5%** |

Landsbankin staðfesti í einum uppriti frá 2010[6], at árligi miðalvøksturin í BTÚ í føstum prísum, seinastu 25 árini, hevði verið 1%. Árligi miðalvøksturin var minkandi seinastu 10 árini av tíðar-skeiðinum. Í hesum 25 ára tíðarskeiðinum hava tað verið ógvuslig sveiggj í føroyska búskapinum. Tíðarskeiðið byrjaði við einum hákonjunkturi í 1985. Fyrst í 1990-árunum kom føroyski búskapurin út í eina ógvusliga og umfatandi kreppu, síðan gekk tað framá við einari lítlari afturgongd í 2003, einum bráðvøkstri í 2006 og 2007, og einari størri afturgongd í 2008, sum tó ikki kom nærhendis ógvusligu afturgongdini fyrst í 1990 árunum. Orsøkin til at árligi miðalvøksturin í føstum prísum hevur verið minkandi seinastu árini í hesum tíðarskeiðinum er m.a., at lítið av fiski hevur verið at fingið við Føroyar, og tí at húsarhaldini hava valt at spart upp og niðurgoldið skuld ístaðin fyri at brúka pengar.

Umframt søgulig hagtøl um búskaparvøkstur og inntøkur landskassans, so verða forsagnir hjá millum annað Búskaparráðnum og Landsbankanum brúkt sum grundarlag fyri at meta um inntøkur landskassans frá 2012 til 2017. Búskaparráðið og Landsbankin meta, at vøksturin í BTÚ í 2012 og 2013 verður millum 2 og 3% í leypandi prísum, ella umleið 0-1% um árið í føstum prísum. Tað skal eisini viðmerkjast, at serlig viðurskifti í ávísum vinnugreinum, sum Fíggjarmálaráðið er vitandi um, eisini eru tikin við í grundarlagið fyri framskrivingunum. Inntøkuframskrivinagarnar frá 2013 til 2017 eru, eins og útreiðsluframskrivingarnar fyri hetta tíðarskeiðið, eisini grundaðar á sokallaðar mongdarframskrivingar, har atlit ikki eru tikin til møguligar lønar- og prísbroytingar.

Skattalættin á umleið 260 mió. kr. árliga fer at økja um heimliga eftirspurningin eftir vørum og tænastum og harvið eisini avgjaldsinntøkur landskassans. Meirvirðisgjaldsinntøkur landskassans verða tí mettar at vaksa 9,5% frá 2011 til 2012. Í 2013 verður vøksturin í inntøkunum frá meirvirðisgjaldi og vanligum landsskatti mettur til 4%. Frá 2013 til 2017 verður árligi miðalvøksturin í føstum prísum í meirvirðisgjaldsinntøkum og vanliga landsskattinum mettur at verða 2,0%.

[5] Orsøkin til munin í árliga miðalvøksturin í samlaðu inntøkum landskassans og skatta- og avgjaldsinntøkunum í talvu 5.2 er skerjingin av heildarveitingini á 366 mió. kr. í 2002.
[6] Upprit frá Landsbanka Føroya, dagfest 28.02.2010, Jnr. 10/00078 SP.

# 6. FRAMSKRIVINGAR

Talva 6.1 vísir framskrivingar fyri árini 2012-2017. Tølini fyri 2012 eru fíggjarlógartøl, og tølini árini eftir eru fíggjarlógartølini fyri 2012 við teimum framskrivingum, sum vóru kendar í mars 2012.

**Talva 6.1: §1-§20 framskrivingar tilsamans**

| *Mió. kr.* | **2012** | **2013** | **2014** | **2015** | **2016** | **2017** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarj.** | **2.876.395** | **2.923.584** | **2.954.090** | **2.957.344** | **2.963.845** | **2.974.164** |
| *Indeks* | *100* | *102* | *103* | *103* | *103* | *103* |
| **Lógarb. játtan** | **1.414.416** | **1.441.263** | **1.458.773** | **1.482.922** | **1.508.339** | **1.532.879** |
| *Indeks* | *100* | *102* | *103* | *105* | *107* | *108* |
| **Stuðulsj.** | **145.434** | **129.552** | **130.101** | **130.658** | **131.223** | **131.796** |
| *Indeks* | *100* | *89* | *89* | *90* | *90* | *91* |
| **Tilsamans** | **4.436.245** | **4.494.399** | **4.542.964** | **4.570.924** | **4.603.407** | **4.638.839** |
| *Indeks* | *100* | *101* | *102* | *103* | *104* | *105* |
| **§ 20 inntøkur** | **-4.336.870** | **-4.328.690** | **-4.411.690** | **-4.469.690** | **-4.529.690** | **-4.589.690** |
| *Indeks* | *100* | *100* | *102* | *103* | *104* | *106* |

*Viðm.: 2012-tølini eru fíggjarlógartøl, uttan møguligar eykajáttanir.*

Framskrivað er við metingum av ymsu játtanunum á fíggjarlógini. Til dømis er tal av fólkapensjónistum, fyritíðarpensjónistum, tal av næmingum og lesandi, bundnar raðfestingar til ellis- og røktarheim, heilivágskostnaður, og tøl samsvarandi hesum, sett inn í framskrivingarnar.

Í appendiks 1 síggjast útgreiningar av framskrivingunum býttar eftir grein og høvuðskontu. Eisini eru viðmerkingar til framskrivingarnar.

# 7. TILTØK 2013-2017

Tiltøkini eru býtt upp í sparitiltøk og raðfestingar, sum landsstýrið ætlar at fremja í 2013 og frameftir.

**Talva 7.1: Tiltøk 2013-2017 býtt á greinar**

| Grein | Útreiðslutiltøk | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| § 2 | Løgmansfyrisiting | - | 500 | 1.200 | 1.900 | 2.300 |
| § 3 | Fíggjarmál | 4.500 | 11.000 | 18.000 | 24.500 | 31.500 |
| § 5 | Fiskivinnumál | 800 | 3.500 | 5.400 | 7.200 | 8.600 |
| § 6 | Vinnumál | 2.900 | 9.900 | 12.000 | 12.000 | 12.000 |
| § 7 | Mentamál | 9.300 | 28.200 | 36.200 | 44.200 | 56.700 |
| § 11 | Heilsumál | 3.600 | 18.600 | 29.700 | 40.000 | 48.600 |
| § 12 | Almannamál | 52.300 | 62.900 | 69.100 | 113.100 | 118.100 |
| § 15 | Innlendismál | 400 | 2.100 | 3.254 | 4.290 | 4.290 |
| | **Rakstrartiltøk tilsamans** | **73.800** | **136.700** | **174.900** | **247.200** | **282.100** |
| § 20 | Inntøkur | 141.000 | 141.000 | 141.000 | 141.000 | 141.000 |
| | **Tiltøk tilsamans** | **214.800** | **277.700** | **315.854** | **388.190** | **423.090** |

Í appendiks 2 síggjast útgreiningar av tiltøkunum býttar eftir grein og høvuðskontu. Eisini eru viðmerkingar til framskrivingarnar.

# 8. LØGUR 2012-2017

Talva 8.1 vísur løguætlan landsstýrisins fyri 2013-2017 býtt á greinar.

**Talva 8.1: Løgur 2013-2017 býtt á greinar**

| Grein | Útreiðslutiltøk | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **§ 2** | Løgmansfyrisiting | 3.000 | 3.000 | 3.000 | 3.000 | 3.000 |
| **§ 3** | Fíggjarmál | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **§ 5** | Fiskivinnumál | 0 | 0 | 0 | 0 | 85.000 |
| **§ 6** | Vinnumál | 24.450 | 21.400 | 34.500 | 1.000 | 10.000 |
| **§ 7** | Mentamál | 107.000 | 107.000 | 109.000 | 69.000 | 13.500 |
| **§ 11** | Heilsumál | 49.800 | 54.000 | 40.000 | 95.000 | 69.000 |
| **§ 12** | Almannamál | 46.700 | 15.800 | 19.250 | 18.450 | 8.500 |
| **§ 15** | Innlendismál | 67.600 | 98.600 | 92.100 | 109.400 | 110.900 |
| | **Løgur tilsamans** | **298.550** | **299.800** | **297.850** | **295.850** | **299.900** |

Landsstýrið hevur sett upp langtíðarløguætlan fyri árini 2013-2024, sí appendiks 3, har løgurnar eru ítøkiliga útgreinaðar fyri árini 2013-2024.

Løgukarmurin hækkar til áleið 300 mió. kr., um árið, frá 2013-2024.

Størstu løgukonturnar í 2013 eru Marknagilsdepilin (85 mió. kr.), Landssjúkrahúsið (30 mió. kr.), vardir bústaðir (31 mió. kr.) og umvæling av almennum bygningum (26,5 mió. kr.). Løgurnar hjá landinum fara sostatt í stóran mun at stimbra virksemið í handverkara- og byggivinnuna í 2013.

# 9. ÚRSLIT 2013-2017

Talva 9.1 vísir eina ætlan, hvussu málið at fáa avlop aftur á fíggjarlógina í 2016 kann røkkast. Stýrt verður eftir RLÚ-úrslitinum. RLÚ-úrslitið á fíggarlógini fyri 2012 er 365 mió. kr. í halli, men skal síðan minkast stigvíst, ár fyri ár, til tað aftur verður avlop á fíggjarlógini í 2016.

**Talva 9.1: Høvuðsyvirlit yvir RLÚ-úrslit 2012-2017**

| *Mió. kr.* | **2012** | **2013** | **2014** | **2015** | **2016** | **2017** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Inntøkur, §20:** | | | | | | |
| Inntøkur byrjan | 4.425 | 4.425 | 4.540 | 4.625 | 4.695 | 4.769 |
| Framskrivingar | 0 | -26 | 85 | 70 | 74 | 75 |
| Ætlað tiltøk í árinum | 0 | 141 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **Inntøkur tilsamans** | **4.425** | **4.540** | **4.625** | **4.695** | **4.769** | **4.844** |
| *Indeks* | *100* | *103* | *105* | *106* | *108* | *109* |
| **Rakstrarútreiðslur, §1-§15:** | | | | | | |
| Útreiðslur byrjan | -4.436 | -4.436 | -4.420 | -4.406 | -4.396 | -4.357 |
| Framskrivingar | 0 | -58 | -49 | -28 | -33 | -36 |
| Ætlað tiltøk í árinum | 0 | 74 | 63 | 38 | 72 | 35 |
| **Rastrarútreiðslur tilsamans** | **-4.436** | **-4.420** | **-4.406** | **-4.396** | **-4.357** | **-4.358** |
| *Indeks* | *100* | *100* | *99* | *99* | *98* | *98* |
| **Løguútreiðslur, §1-§15** | **-266** | **-299** | **-300** | **-298** | **-296** | **-300** |
| *Indeks* | *100* | *112* | *113* | *112* | *111* | *113* |
| **Rentuútreiðslur netto, §20** | **-88** | **-70** | **-72** | **-84** | **-98** | **-113** |
| *Indeks* | *100* | *80* | *82* | *95* | *111* | *128* |
| **RLÚ-úrslit** | **-365** | **-250** | **-153** | **-83** | **19** | **74** |

# APPENDIKS 1: FRAMSKRIVINGAR

Talvurnar vísa framskrivingar fyri 2013-2017 býttar á greinar, játtanarsløg og høvuðskontur. Fyri hvørja grein á fíggjarlógini er fyrst ein talva, sum telur saman, og síðan er ein talva har einans tær høvuðskonturnar eru við, sum verða framskrivaðar.

## § 1 Løgtingið

**Talva A.1: Samlaðar framskrivingar fyri § 1 Løgtingið**

| *Tús. kr.* | **FL2012** | **2013** | **2014** | **2015** | **2016** | **2017** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarj.** | **39.325** | **39.325** | **39.325** | **39.325** | **39.325** | **39.325** |
| *Indeks* | *100* | *100* | *100* | *100* | *100* | *100* |
| **Lógarb. játtan** | **7.000** | **5.275** | **5.675** | **6.675** | **7.675** | **6.175** |
| *Indeks* | *100* | *75* | *81* | *95* | *110* | *88* |
| **Stuðulsj.** | **0** | **0** | **0** | **0** | **0** | **0** |
| *Indeks* | - | - | - | - | - | - |
| **Tilsamans** | **46.325** | **44.600** | **45.000** | **46.000** | **47.000** | **45.500** |
| *Indeks* | *100* | *96* | *97* | *99* | *101* | *98* |

**Talva A.2: Útgreinaðar framskrivingar fyri § 1 Løgtingið**

| *Tús. kr.* | **FL2012** | **2013** | **2014** | **2015** | **2016** | **2017** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Lógarbundin játtan** | | | | | | |
| Eftirløn og bíðiløn til løgtingsmenn | 7.000 | 5.275 | 5.675 | 6.675 | 7.675 | 6.175 |
| **Lógarb. játtan tilsamans** | **7.000** | **5.275** | **5.675** | **6.675** | **7.675** | **6.175** |
| *Indeks* | *100* | *75* | *81* | *95* | *110* | *88* |

**Eftirløn og bíðiløn til løgtingsmenn**: Játtanin lækkar í 2013, tí útreiðslan til bíðiløn í sambandi við løgtingsvalið í 2011 fellur burtur. Um løgtingsval verður við ársenda í 2015, hevur tað við sær, at útreiðslur verða til bíðiløn í 2015 og 2016. Annars er játtanin hækkandi vegna øktar útreiðslur til eftirløn.

## § 2 Løgmansfyrisitingin

**Talva A.3: Samlaðar framskrivingar fyri § 2 Løgmansfyrisitingin**

| *Tús. kr.* | FL2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarj.** | **39.550** | **38.880** | **38.880** | **39.550** | **38.880** | **38.880** |
| *Indeks* | *100* | *98* | *98* | *100* | *98* | *98* |
| **Lógarb. játtan** | **0** | **0** | **0** | **0** | **0** | **0** |
| *Indeks* | - | - | - | - | - | - |
| **Stuðulsj.** | **7.950** | **7.950** | **7.950** | **7.950** | **7.950** | **7.950** |
| *Indeks* | *100* | *100* | *100* | *100* | *100* | *100* |
| **Tilsamans** | **47.500** | **46.830** | **46.830** | **47.500** | **46.830** | **46.830** |
| *Indeks* | *100* | *99* | *99* | *100* | *99* | *99* |

**Talva A.2: Útgreinaðar framskrivingar fyri § 1 Løgmansfyrisitingin**

| *Tús. kr.* | FL2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarjáttan:** | | | | | | |
| Løgmaður og landsstýrið | 7.000 | 6.330 | 6.330 | 7.000 | 6.330 | 6.330 |
| **Rakstrarjáttan tilsamans** | **7.000** | **6.330** | **6.330** | **7.000** | **6.330** | **6.330** |
| *Indeks* | *100* | *90* | *90* | *100* | *90* | *90* |

**Løgmaður og landsstýrið:** Játtanin lækkar í 2013, tí útreiðslan til bíðiløn í sambandi við løgtingsvalið í 2011 fellur burtur. Eisini verður roknað við eykaútreiðslum til bíðiløn í sambandi við, at løgtingsval verður í seinasta lagi í 2015.

## § 3 Fíggjarmál

**Talva A.4: Samlaðar framskrivingar fyri § 3 Fíggjarmál**

| *Tús. kr.* | **FL2012** | **2013** | **2014** | **2015** | **2016** | **2017** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarjáttan** | **121.916** | **116.566** | **116.866** | **113.066** | **111.866** | **111.566** |
| *Indeks* | *100* | *96* | *96* | *93* | *92* | *92* |
| **Lógarb. játtan** | **177.900** | **177.105** | **177.726** | **182.279** | **186.250** | **189.900** |
| *Indeks* | *100* | *100* | *100* | *102* | *105* | *107* |
| **Stuðulsjáttan** | **200** | **200** | **200** | **200** | **200** | **200** |
| *Indeks* | *100* | *100* | *100* | *100* | *100* | *100* |
| **Tilsamans** | **300.016** | **293.871** | **294.792** | **295.545** | **298.316** | **301.666** |
| *Indeks* | *100* | *98* | *98* | *99* | *99* | *101* |

**Talva A.5: Útgreinaðar framskrivingar fyri § 3 Fíggjarmál**

| *Tús. kr.* | **FL2012** | **2013** | **2014** | **2015** | **2016** | **2017** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarjáttan:** | | | | | | |
| Sáttmálaviðurskifti | 600 | 300 | 600 | 300 | 600 | 300 |
| Hagtova Føroya | 12.390 | 9.040 | 9.040 | 9.040 | 9.040 | 9.040 |
| TAKS | 69.187 | 67.487 | 67.487 | 63.987 | 62.487 | 62.487 |
| **Rakstrarjáttan tilsamans** | **82.177** | **76.827** | **77.127** | **73.327** | **72.127** | **71.827** |
| *Indeks* | *100* | *93* | *94* | *89* | *88* | *87* |
| **Lógarb. játtan:** | | | | | | |
| Tænastumannaeftirlønir | 22.000 | 22.905 | 23.776 | 24.679 | 25.000 | 25.000 |
| Læraraeftirlønir, útreiðslujáttan | 59.400 | 61.000 | 64.000 | 68.000 | 72.000 | 76.000 |
| Læraraeftirlønir, endurgjald | -22.950 | -23.850 | -24.750 | -25.650 | -26.550 | -27.450 |
| Eftirlønir innan heilsuverkið | 13.350 | 13.850 | 14.400 | 14.950 | 15.500 | 16.050 |
| Postverk Føroya | 7.850 | 8.800 | 9.800 | 9.800 | 9.800 | 9.800 |
| Danskar eftirlønir | 1.500 | 1.550 | 1.600 | 1.600 | 1.600 | 1.600 |
| Eftirlønir landsstýrismanna | 2.200 | 2.300 | 2.350 | 2.350 | 2.350 | 2.350 |
| Stuðul til rentuúteiðslur | 78.000 | 74.000 | 70.000 | 70.000 | 70.000 | 70.000 |
| **Lógarb. játtan tilsamans** | **161.350** | **160.555** | **161.176** | **165.729** | **169.700** | **173.350** |
| *Indeks* | *100* | *100* | *100* | *103* | *105* | *107* |

**Sáttmálaviðurskifti**: Framskrivað sambært meting um samráðingarvirksemi.

**Hagstova Føroya**: Játtanin til Manntal fellur burtur í 2013.

**TAKS**: Eykaútreiðslur í sambandi við broytingina í pensjónsskattingini hava havt við sær, at 2,7 mió. kr. eyka eru settar av í 2012. Henda játtan fellur burtur í 2013.

Harumframt hevur TAKS, í sambandi við umlegging av skattaskipanini, hesar eykaútreiðslur: 4 mió. kr. í 2012, 5 mió. kr. í 2013, 5 mió. kr. í 2014 og 1,5 mió. kr. í 2015.

**Ymiskar eftirlønir**: Framskrivað sambært metingum.

**Stuðul til rentuútreiðslur**: Sambært galdandi lóg lækkar rentustuðulin 1 prosentstig bæði í 2013 og í 2014.

## § 5 Fiskivinnumál

**Talva A.6: Samlaðar framskrivingar fyri § 5 Fiskivinnumál**

| *Tús. kr.* | FL2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarjáttan** | **134.542** | **134.542** | **134.542** | **134.542** | **134.542** | **134.542** |
| *Indeks* | *100* | *100* | *100* | *100* | *100* | *100* |
| **Lógarb. játtan** | **2.500** | **2.500** | **2.500** | **2.500** | **2.500** | **2.500** |
| *Indeks* | *100* | *100* | *100* | *100* | *100* | *100* |
| **Stuðulsjáttan** | **13.610** | **13.610** | **13.610** | **13.610** | **13.610** | **13.610** |
| *Indeks* | *100* | *100* | *100* | *100* | *100* | *100* |
| **Tilsamans** | **150.652** | **150.652** | **150.652** | **150.652** | **150.652** | **150.652** |
| *Indeks* | *100* | *100* | *100* | *100* | *100* | *100* |

Ongar framskrivingar eru á §5 fyri árini 2012-2017.

## § 6 Vinnumál

**Talva A.8: Samlaðar framskrivingar fyri § 6 Vinnumál**

| *Tús. kr.* | FL2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarjáttan** | **187.467** | **187.467** | **187.467** | **187.467** | **187.467** | **187.467** |
| *Indeks* | *100* | *100* | *100* | *100* | *100* | *100* |
| **Lógarb. játtan** | **87.500** | **88.300** | **88.300** | **88.300** | **88.300** | **88.300** |
| *Indeks* | *100* | *101* | *101* | *101* | *101* | *101* |
| **Stuðulsjáttan** | **19.150** | **19.225** | **19.225** | **19.225** | **19.225** | **19.225** |
| *Indeks* | *100* | *100* | *100* | *100* | *100* | *100* |
| **Tilsamans** | **294.117** | **294.992** | **294.992** | **294.992** | **294.992** | **294.992** |
| *Indeks* | *100* | *100* | *100* | *100* | *100* | *100* |

**Talva A.9: Útgreinaðar framskrivingar fyri § 6 Vinnumál**

| *Tús. kr.* | **FL2012** | **2013** | **2014** | **2015** | **2016** | **2017** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Stuðulsjáttan:** | | | | | | |
| Gjald fyri seismisk forkanningarloyvi | -225 | -150 | -150 | -150 | -150 | -150 |
| **Stuðulsjáttan tilsamans** | **-225** | **-150** | **-150** | **-150** | **-150** | **-150** |
| *Indeks* | *100* | *67* | *67* | *67* | *67* | *67* |
| **Lógarb. játtan:** | | | | | | |
| Barsilsskipan | 87.500 | 88.300 | 88.300 | 88.300 | 88.300 | 88.300 |
| **Lógarb. játtan tilsamans** | **87.500** | **88.300** | **88.300** | **88.300** | **88.300** | **88.300** |
| *Indeks* | *100* | *101* | *101* | *101* | *101* | *101* |

**Gjald fyri seismisk forkanningarloyvi:** Roknað verður við 75 tús. kr. minni í árligum inntøkum frá og við 2013.

**Barsilsskipan:** Roknað verður við hækking á 800 tús. kr. í 2013. Árini frameftir verður hildið fast við 2013-støðið, tí útreiðslubroytingar hava við sær samsvarandi inntøkubroytingar á §20.

## § 7 Mentamál

**Talva A.10: Samlaðar framskrivingar fyri § 7 Mentamál**

| *Tús. kr.* | **FL2012** | **2013** | **2014** | **2015** | **2016** | **2017** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarjáttan** | **732.587** | **741.587** | **744.587** | **747.587** | **750.587** | **753.587** |
| *Indeks* | *100* | *101* | *102* | *102* | *102* | *103* |
| **Lógarb. játtan** | **123.679** | **124.751** | **128.289** | **131.793** | **135.372** | **139.002** |
| *Indeks* | *100* | *101* | *104* | *107* | *109* | *112* |
| **Stuðulsjáttan** | **73.074** | **73.717** | **74.366** | **75.023** | **75.688** | **76.361** |
| *Indeks* | *100* | *101* | *102* | *103* | *104* | *104* |
| **Tilsamans** | **929.340** | **940.055** | **947.242** | **954.403** | **961.647** | **968.950** |
| *Indeks* | *100* | *101* | *102* | *103* | *103* | *104* |

**Talva A.11: Útgreinaðar framskrivingar fyri § 7 Mentamál**

| *Tús. kr.* | **FL2012** | **2013** | **2014** | **2015** | **2016** | **2017** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarjáttan:** | | | | | | |
| Fólkaskúlin | 281.601 | 283.601 | 285.601 | 287.601 | 289.601 | 291.601 |
| Miðnámsútbúgvingar | 187.890 | 194.890 | 195.890 | 196.890 | 197.890 | 198.890 |
| **Rakstrarjáttan tilsamans** | **469.491** | **478.491** | **481.491** | **484.491** | **487.491** | **490.491** |
| *Indeks* | *100* | *102* | *103* | *103* | *104* | *104* |
| **Stuðulsjáttan:** | | | | | | |
| Stuðul til fólkaskúlar | 7.786 | 8.286 | 8.786 | 9.286 | 9.786 | 10.286 |
| Lestrarlán | 2.850 | 2.993 | 3.142 | 3.299 | 3.464 | 3.637 |
| **Stuðulsjáttan tilsamans** | **10.636** | **11.279** | **11.928** | **12.585** | **13.250** | **13.923** |
| *Indeks* | *100* | *106* | *112* | *118* | *125* | *131* |
| **Lógarb. játtan:** | | | | | | |
| Lestrarstuðul | 123.679 | 124.751 | 128.289 | 131.793 | 135.372 | 139.002 |
| **Lógarb. játtan tilsamans** | **123.679** | **124.751** | **128.289** | **131.793** | **135.372** | **139.002** |
| *Indeks* | *100* | *101* | *104* | *107* | *109* | *112* |

**Fólkaskúlin**: Játtanin til fólkaskúlan er framskrivað við 2 mió. kr. um árið. Vøkstur skyldast hækkaðum lønarkostnaði vegna aldursbroytingar, og meirkostnaði, tí sáttmálasettir lærarar verða settir í starv fyri tænastumannasettar lærarar, ið fara frá vegna aldur.

**Miðnámsútbúgvingar**: Játtanin er framskrivað við 4 mió. kr. í 2013 og 1 mió. kr. tey fylgjandi árini út frá teimum fortreytum, ið vóru kendar í februar 2012.

Umsøkjaratalið til miðnámsskúlarnar á vári í 2012 vísa, at neyðugt verður við fleiri flokkum enn roknað varð við. Upptøkan vísir, at neyðugt er at hækka játtanina við 3 mió. kr. aftrat til 7 mió. kr.

**Stuðul til fólkaskúlar:** Játtanin er hækkað við 0,5 mió. kr. árliga. Orsøkin er, at frískúlin Keldan tekur ein nýggjan flokk inn á hvørjum ári.

**Lestrarlán:** Játtanin til lestrarlán er hækkað við tí metta vøkstrinum av lántøkum.

**Lestrarstuðul**: Lestrarstuðulin er framskrivaður við øktum virksemi.

## § 11 Heilsumál

**Talva A.12: Samlaðar framskrivingar fyri § 11 Heilsumál**

| *Tús. kr.* | **FL2012** | **2013** | **2014** | **2015** | **2016** | **2017** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarjáttan** | **891.475** | **897.779** | **902.016** | **906.368** | **910.836** | **915.425** |
| *Indeks* | *100* | *101* | *101* | *102* | *102* | *103* |
| **Lógarb. játtan** | **8.700** | **12.700** | **12.700** | **12.700** | **12.700** | **12.700** |
| *Indeks* | *100* | *146* | *146* | *146* | *146* | *146* |
| **Stuðulsjáttan** | **825** | **825** | **825** | **825** | **825** | **825** |
| *Indeks* | *100* | *100* | *100* | *100* | *100* | *100* |
| **Tilsamans** | **901.000** | **911.304** | **915.541** | **919.893** | **924.361** | **928.950** |
| *Indeks* | *100* | *101* | *102* | *102* | *103* | *103* |

**Talva A.13:Útgreinaðar framskrivingar fyri § 11 Heilsumál**

| *Tús. kr.* | **FL2012** | **2013** | **2014** | **2015** | **2016** | **2017** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarjáttan:** | | | | | | |
| Heilsutrygdarveitingar | 147.746 | 149.223 | 149.223 | 149.223 | 149.223 | 149.223 |
| Serstakur sjúkrahúsheilivágur | 34.900 | 36.296 | 37.748 | 39.258 | 40.828 | 42.461 |
| Umsiting av sjúklingatrygging | 300 | 1.000 | 1.000 | 1.000 | 1.000 | 1.000 |
| Serviðgerð uttanlands | 136.555 | 139.286 | 142.071 | 144.913 | 147.811 | 150.767 |
| **Rakstrarjáttan tilsamans** | **319.501** | **325.805** | **330.042** | **334.394** | **338.862** | **343.451** |
| *Indeks* | *100* | *102* | *103* | *105* | *106* | *107* |
| **Lógarb. játtan:** | | | | | | |
| Sjúklingatrygging | 1.000 | 5.000 | 5.000 | 5.000 | 5.000 | 5.000 |
| **Lógarb. játtan tilsamans** | **1.000** | **5.000** | **5.000** | **5.000** | **5.000** | **5.000** |
| *Indeks* | *100* | *500* | *500* | *500* | *500* | *500* |

**Heilsutrygdarveitingar**: Framskrivað verður við 1% hækking í 2013, svarandi til 1,5 mió. kr. Árini frameftir verður hildið fast við 2013-støðið, tí útreiðslubroytingar, hava við sær samsvarandi inntøkubroytingar á §20.

**Serstakur sjúkrahúsheilivágur**: Framskrivað verður við 4% árliga. Hetta er partvís vegna serliga høgan prísvøkstur á heilivági, og partvís vegna vøkstur í mongdini av heilivági.

**Umsiting av Sjúklingatrygging**: Orsakað av, at skipanin er nýggj verður einans roknað við 300 tús. kr. í umsiting í 2012. Men frá og við 2013 verður mett, at talan verður um 1 mió. kr. árliga.

**Serviðgerð uttanlands**: Talið av sjúklingum, ið fáa viðgerð uttanlands er støðugt vaksandi. Framskrivað verður við 2% árliga.

**Sjúklingatrygging**: Orsakað av, at skipanin er nýggj og viðgerðartíðin drúgv, verður einans roknað við at goldnar verða 1 mió. kr. í endurgjaldi í 2012. Men frameftir verður mett, at goldnar verða umleið 5 mió. kr. í endurgjaldi til sjúklingar um árið.

## § 12 Almannamál

**Talva A.14: Samlaðar framskrivingar fyri § 12 Almannamál**

| *Tús. kr.* | **FL2012** | **2013** | **2014** | **2015** | **2016** | **2017** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarjáttan** | **626.528** | **665.633** | **688.602** | **685.834** | **688.537** | **691.567** |
| *Indeks* | *100* | *106* | *110* | *109* | *110* | *110* |
| **Lógarb. játtan** | **1.006.837** | **1.030.332** | **1.043.283** | **1.058.375** | **1.075.242** | **1.094.002** |
| *Indeks* | *100* | *102* | *104* | *105* | *107* | *109* |
| **Stuðulsjáttan** | **29.130** | **12.630** | **12.630** | **12.630** | **12.630** | **12.630** |
| *Indeks* | *100* | *43* | *43* | *43* | *43* | *43* |
| **Tilsamans** | **1.662.495** | **1.708.595** | **1.744.515** | **1.756.839** | **1.776.409** | **1.798.199** |
| *Indeks* | *100* | *103* | *105* | *106* | *107* | *108* |

**Talva A.15: Útgreinaðar framskrivingar fyri § 12 Almannamál**

| *Tús. kr.* | **FL2012** | **2013** | **2014** | **2015** | **2016** | **2017** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarjáttan:** | | | | | | |
| KT-heildarskipan | 4.500 | 5.000 | 5.000 | 0 | 0 | 0 |
| Børn og ung | 45.501 | 46.201 | 46.901 | 46.901 | 46.901 | 46.901 |
| Serforsorg | 172.837 | 183.409 | 201.453 | 201.453 | 201.453 | 201.453 |
| Eldrarøkt | 317.933 | 345.766 | 349.991 | 352.223 | 354.926 | 357.956 |
| **Rakstrarjáttan tilsamans** | **540.771** | **580.376** | **603.345** | **600.577** | **603.280** | **606.310** |
| *Indeks* | *100* | *107* | *112* | *111* | *112* | *112* |
| **Stuðulsjáttan:** | | | | | | |
| Stuðul til feløg hjá brekaðum | 3.432 | 3.632 | 3.632 | 3.632 | 3.632 | 3.632 |
| Studningslán til eldrabústaðir | 16.700 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **Stuðulsjáttan tilsamans** | **20.132** | **3.632** | **3.632** | **3.632** | **3.632** | **3.632** |
| *Indeks* | *100* | *18* | *18* | *18* | *18* | *18* |
| **Lógarb. játtan:** | | | | | | |
| Barnavernd | 6.768 | 6.768 | 6.971 | 7.180 | 7.396 | 7.617 |
| Stuðul til uppihaldspening | 5.666 | 4.666 | 4.666 | 4.666 | 4.666 | 4.666 |
| Dagpeningaskipan | 52.122 | 54.857 | 55.381 | 55.910 | 56.444 | 56.984 |
| Vanlig forsorg | 145.751 | 144.557 | 146.162 | 147.796 | 149.455 | 151.139 |
| Fólkapensjón | 456.615 | 469.584 | 478.506 | 489.512 | 502.239 | 516.804 |
| Fyritíðarpensjón | 277.516 | 278.901 | 280.299 | 281.711 | 283.137 | 284.578 |
| Viðbót til ávísar pensjónistar | 29.945 | 29.945 | 30.244 | 30.546 | 30.851 | 31.160 |
| **Lógarb. játtan tilsamans** | **974.383** | **989.278** | **1.002.229** | **1.017.321** | **1.034.188** | **1.052.948** |
| *Indeks* | *100* | *102* | *103* | *104* | *106* | *108* |

**Javning:** Játtanin í 2013 og frameftir er hækkað við 8,1 mió. kr. fyri at leggja upp fyri javning. Hetta svarar til 1,7%. Talan er um 8,6 mió. kr. á lógarbundnum útreiðslum og inntøkum undir eldrarøktini á 0,5 mió. kr.

**KT-heildarskipan til Almannastovuna**: Verklagslóg, "Løgtingslóg nr. 110 frá 8. desember 2010 um keyp av øðrum parti av nýggjari kt-heildarskipan til Almannastovuna", er galdandi fyri økið. Sambært viðmerkingum til lógina, falla 5 mió. kr. til gjaldingar í 2013 og 5 mió. kr. í 2014.

**Børn og ung**: Framskrivað er fyri fíggjarligum avleiðingum av "Løgtingslóg nr. 79 frá 7. juni 2011 um bygging av stovni í Eysturoynni til børn við fjølbreki." Sambært viðmerkingum til lógina er ilt at meta um, hvør rakstrarkostnaðurin verður, tá nýggi stovnurin letur upp, men talan er um ein sera tungan bólk av børnum við fjølbreki.

Verandi stovnur, Reiðrið, verður niðurlagdur, tá nýggi stovnurin letur upp og lagt verður upp fyri hægri árligum rakstrarútreiðslum. Játtanin til verandi stovn, Reiðrið, er umleið 2,6 mió. kr. í 2012. Avsett er til hægri játtan frá 1. juli 2013, 0,7 mió. kr. og játtanin er hækkað við 0,7 mió. kr. afturat í 2014 til fult virksemi, soleiðis at samlaða játtanin til nýggja stovnin verður 4 mió. kr. í 2014

**Serforsorg**: Framskrivað er fyri fíggjarligum avleiðingum av fylgjandi løgtingslógum, "Løgtingslóg nr. 78 frá 7. juni 2011 um bygging av sambýli í Tórshavn til fólk við sálarsjúku" og "Løgtingslóg nr. 81 frá 7. juni 2011 um at byggja vardar bústaðir í Norðoyggjum og Eysturoy til fólk við serligum tørvi".

Orsakað av seinkan í byggingini av sambýli fyri sálarsjúk, verður lagt upp fyri, at heimið letur upp í juni 2013, ikki í januar 2013, sum upprunaliga var ætlað. Dagsprísurin er 1.700 kr. og búfólkatalið er mett at verða 16. Avsettar eru 5,9 mió. kr. í 2013, í 2014 verður játtanin hækkað við 4 mió. kr. til fult virksemi, soleiðis at samlaða játtanin verður 9,9 mió. kr. í 2014.

Orsakað av seinkan í byggingini av vardum bústøðum í Norðoyggjum og Eysturoy til fólk við serligum tørvi, verður lagt upp fyri, at bústaðirnir lata upp í oktober 2013, ikki í juli 2013 sum upprunaliga ætlað. Dagsprísurin er 1.600 og búfólkatalið verður mett at verða 32. Avsettar eru 5,3 mió. kr. í 2013, í 2014 verður játtanin hækkað við 13,4 mió. kr. til fult virksemi, soleiðis at samlaða játtanin verður 18,7 mió. kr. í 2014.

**Eldrarøkt**: Løgtingslóg um uppihald á stovni varð sett úr gildi frá 1. januar 2012. Løgtingssamtyktin hevur við sær, at pensjónistar á røktarheimum varðveita pensjónina, og skulu pensjónistar frameftir rinda fyri uppihald v.m. Hetta hevur havt við sær, at dagsprísurin til Ellis- og røktarheim er lækkaður frá 2011 til 2012. Dagsprísurin fyri 2012 er brúktur sum grundarlag fyri útreiðslunum til nýggju ellis- og røktarheimini.

Inntøkurnar til eldrarøktina vaksa, samstundis sum nýggju ellis- og røktarheimini lata upp, tí at pensjónistar nú rinda fyri uppihald. Um minsta gjald verður brúkt sum grundarlag, verður mett, at inntøkurnar í 2013 vaksa við 6 mió. kr. og í 2014 vaksa við 1,2 mió. kr.

Lagt er upp fyri fullum virksemi á Ellis- og røktarheiminum í Tórshavn í 2013, 23 mió. kr. Samstundis, sum tað verður fult virksemi, verður ein sparing í heimatænastuni, sum er mett til 1,9 mió. kr.

Lagt er upp fyri fullum virksemi á Ellis- og røktarheiminum í Vestmanna í 2013, 4,6 mió. kr. Samstundis, sum tað verður fult virksemi, verður ein sparing í heimatænastuni, sum er mett til 0,4 mió. kr.

Lagt er upp fyri, at Ellis og røktarheimið í Klaksvík letur upp í mai 2013, 7,7 mió. kr. og eini sparing í heimatænastuni á 0,6 mió. kr. Í 2014 verður fult virksemi, 3,8 mió. kr. og ein sparing í heimatænastuni á 0,3 mió. kr.

Hagstova Føroya hevur gjørt eina meting um øking í fólkatalinum í aldursbólkinum 67 ár og eldri. Nærverkið hevur gjørt eina útrokning, sum vísir, at miðalkostnaðurin fyri heimatænastu til borgarar 67 ár og eldri, er umleið 15 tús. kr. árliga pr. fólk. Um verandi tænastustøði ikki skal versna, verður neyðugt at leggja fíggjarliga upp fyri hesum vøkstri, og verður tí 2013 framskrivað við 1,6 mió. kr., í 2014 við 1,9 mió. kr., í 2015 við 2,3 mió. kr., í 2016 við 2,7 mió. kr. og í 2017 við 3,0 mió. kr.

**Stuðul til feløg hjá brekaðum**: Játtanin er hækkað við 0,2 mió. kr. í 2013 til Hjálpargrunnin fyri óarbeiðsførar fiskimenn.

**Studningslán til eldrabústaðir**: Heimildin til at lata studningslán er sambært Løgtingslóg nr. 48 frá 11. mai 2009 um studningslán til ellis- og røktarheim og eldrasambýli, sum broytt við Løgtingslóg nr. 175 frá 29. desember 2011. Lógin er galdandi til 31. desember 2013. Ongar tilsagnir eru um studningslán.

**Barnavernd**: Hækkingar vegna príshækkingar í Danmark o.a.

**Stuðul til uppihaldspening**: Mett verður, at talan verður um lækking á 1 mió. kr. í 2013.

**Dagpeningaskipanin**: Økt dagatal og lønarhækkingar.

**Vanlig forsorg**: Vaksandi tal av móttakarum.

**Fólkapensjón**: Vaksandi tal av fólki, ið eru 67 ár ella eldri.

**Fyritíðarpensjón**: Vaksandi tal av fólki ið fáa fyritíðarpensjón.

**Viðbót til ávísar pensjonistar**: Vaksandi tal av fólki, ið eru 67 ár ella eldri og hava lága inntøku.

## § 15 Innlendismál

**Talva A.16: Samlaðar framskrivingar fyri § 15 Innlendismál**

| *Tús. kr.* | **FL2012** | **2013** | **2014** | **2015** | **2016** | **2017** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarjáttan** | **103.005** | **101.805** | **101.805** | **103.605** | **101.805** | **101.805** |
| *Indeks* | *100* | *99* | *99* | *101* | *99* | *99* |
| **Lógarb. játtan** | **300** | **300** | **300** | **300** | **300** | **300** |
| *Indeks* | *100* | *100* | *100* | *100* | *100* | *100* |
| **Stuðulsjáttan** | **1.495** | **1.395** | **1.295** | **1.195** | **1.095** | **995** |
| *Indeks* | *100* | *93* | *87* | *80* | *73* | *67* |
| **Tilsamans** | **104.800** | **103.500** | **103.400** | **105.100** | **103.200** | **103.100** |
| *Indeks* | *100* | *99* | *99* | *100* | *98* | *98* |

**Talva A.17: Útgreinaðar framskrivingar fyri § 15 Innlendismál**

| *Tús. kr.* | **FL2012** | **2013** | **2014** | **2015** | **2016** | **2017** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarjáttan:** | | | | | | |
| Ymsar útreiðslur | 2.200 | 1.000 | 1.000 | 2.800 | 1.000 | 1.000 |
| **Rakstrarjáttan tilsamans** | **2.200** | **1.000** | **1.000** | **2.800** | **1.000** | **1.000** |
| *Indeks* | *100* | *45* | *45* | *127* | *45* | *45* |
| **Stuðulsjáttan:** | | | | | | |
| Lánsafturgjald | -3.700 | -3.800 | -3.900 | -4.000 | -4.100 | -4.200 |
| **Stuðulsjáttan tilsamans** | **-3.700** | **-3.800** | **-3.900** | **-4.000** | **-4.100** | **-4.200** |
| *Indeks* | *100* | *103* | *105* | *108* | *111* | *114* |

**Ymsar útreiðslur**: Hædd verður tikin fyri eykaútreiðslum í sambandi við, at løgtingsval verður í seinasta lagi í 2015.

**Lánsafturgjald**: Talan er um avdráttir av einum annuitetsláni, sum IRF rindar landsstýrinum. Avdráttarparturin er vaksandi.

## § 20 Inntøkur

**Talva A.19: Samlaðar framskrivingar fyri § 20 Inntøkur**

| *Tús. kr.* | **FL2012** | **2013** | **2014** | **2015** | **2016** | **2017** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Rentur | 88.000 | 70.000 | 72.000 | 84.000 | 98.000 | 113.000 |
| Skattir | -2.087.310 | -2.009.590 | -2.064.590 | -2.107.590 | -2.143.590 | -2.182.590 |
| Avgjøld og tollur | -1.683.000 | -1.736.000 | -1.766.000 | -1.793.000 | -1.824.000 | -1.855.000 |
| Ymsar inntøkur | -30.460 | -29.000 | -29.000 | -29.000 | -36.000 | -41.000 |
| Heildarveiting | -624.100 | -624.100 | -624.100 | -624.100 | -624.100 | -624.100 |
| **Tilsamans** | **-4.336.870** | **-4.328.690** | **-4.411.690** | **-4.469.690** | **-4.529.690** | **-4.589.690** |
| *Indeks* | *100* | *100* | *102* | *103* | *104* | *106* |

**Talva A.20: Útgreinaðar framskrivingar fyri § 20 Inntøkur**

| *Tús. kr.* | **FL2012** | **2013** | **2014** | **2015** | **2016** | **2017** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Ógreinað:** | | | | | | |
| Rentur at gjalda | 140.000 | 141.000 | 163.000 | 184.000 | 197.000 | 212.000 |
| Rentuinntøkur av innistandandi | -20.000 | -39.000 | -59.000 | -68.000 | -67.000 | -67.000 |
| Vanligur landsskattur | -1.200.000 | -1.248.000 | -1.273.000 | -1.298.000 | -1.324.000 | -1.350.000 |
| Kolvetnisskattur, persónar | -25.000 | 0 | -20.000 | 0 | 0 | 0 |
| Felagsskattur | -132.000 | -140.000 | -150.000 | -167.000 | -177.000 | -180.000 |
| Kolvetnisskattur, feløg | -2.000 | -10.000 | 0 | -10.000 | 0 | 0 |
| Tilfeingisskattur | -10.000 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Kapitalvinningsskattur | -255.000 | -123.000 | -125.000 | -127.000 | -129.000 | -131.000 |
| Avgjald av kapitaleftirlønum | -33.000 | -45.000 | -48.000 | -52.000 | -55.000 | -58.000 |
| Skattur av pensjónsinngjøldum | -220.000 | -230.000 | -235.000 | -240.000 | -245.000 | -250.000 |
| Arvagjøld | -4.000 | -5.000 | -5.000 | -5.000 | -5.000 | -5.000 |
| Gjald til Heilsutrygd | -114.170 | -115.650 | -115.650 | -115.650 | -115.650 | -115.650 |
| Barsilsgjald | -89.300 | -90.100 | -90.100 | -90.100 | -90.100 | -90.100 |
| Meirvirðisgjald | -1.285.000 | -1.336.000 | -1.363.000 | -1.390.000 | -1.418.000 | -1.446.000 |
| Punktgjøld | -197.000 | -200.000 | -203.000 | -206.000 | -209.000 | -212.000 |
| Skrásetingargjald | -68.000 | -70.000 | -72.000 | -74.000 | -77.000 | -80.000 |
| Útluting úr Fíggingargrunninum | -5.000 | -3.000 | -3.000 | -3.000 | -10.000 | -15.000 |
| Aðrar inntøkur | -14.460 | -15.000 | -15.000 | -15.000 | -15.000 | -15.000 |
| Endurrindan av keyps-MVG | 140.000 | 143.000 | 145.000 | 150.000 | 153.000 | 156.000 |
| **Tilsamans** | **-3.393.930** | **-3.385.750** | **-3.468.750** | **-3.526.750** | **-3.586.750** | **-3.646.750** |
| *Indeks* | *100* | *100* | *102* | *104* | *106* | *107* |

**Rentur at gjalda:** Fortreytirnar eru metta gongdin í landskassaskuldini og í rentustøðinum.

**Rentuinntøkur av innistandandi:** Fortreytirnar eru metta gongdin í fíggjarogn landskassans og í rentustøðinum.

**Vanligur landsskattur:** Framskrivað verður við vøkstri á 4% í 2013. Árini frameftir verður framskrivað við vøkstri á 2% árliga.

**Kolvetnisskattur, persónar:** Útlit eru fyri leitingarvirksemi í 2012 og 2014.

**Felagsskattur:** Roknað verður við munandi vøkstri komandi árini.

**Kolvetnisskattur, feløg:** Útlit eru fyri leitingarvirksemi í 2012 og 2014, og sæst hetta aftur í felagsskattinum árið eftir.

**Tilfeingisskattur:** Sambært galdandi lóg fellur tilfeingis/loyvisskatturin burtur í 2013.

**Kapitalvinningsskattur:** Sølan av Havsbrún, hevur við sær óvanliga stórar inntøkur í 2012. Í 2013 verður inntøkan mett at verða á einum meira vanligum støði. Síðani verður mett, at talan verður um eina hækking á 2 mió. kr. árliga.

**Avgjald av kapitaleftirlønum:** Roknað verður við munandi vøksti komandi árini. Orsøkin er, at teir árgangir, sum nú gerast eldri, í nógv størri mun enn teir undanfarnu, hava spart upp til kapitaleftirløn.

**Skattur av pensjónsinngjøldum:** Skattagrundarlagið er nakað minni í 2012, tí at inngjald til danskar eftirlønarskipanir ikki verður skattað fyrr enn eftir 1. juli 2012. Harumframt fer ætlaða pensjónsnýskipanin at hava við sær vaksandi skattagrundarlag frá 2013 og frameftir. Framskrivað verður við hækking á 10 mió. kr. í 2013, og árini frameftir verður framskrivað við 5 mió. kr. árliga.

**Arvagjøld:** Roknað verður við hækking á 1 mió. kr. í 2013.

**Gjald til Heilsutrygd:** Roknað verður við hækking á 1,5 mió. kr. í 2013. Árini frameftir verður hildið fast við 2013-støðið, tí útreiðslubroytingar á §11 hava við sær samsvarandi inntøkubroytingar.

**Barsilsgjald:** Roknað verður við hækking á 800 tús. kr. í 2013. Árini frameftir verður hildið fast við 2013-støðið, tí útreiðslubroytingar á §6 hava við sær samsvarandi inntøkubroytingar.

**Meirvirðisgjald:** Framskrivað verður við vøkstri á 4% í 2013. Árini frameftir verður framskrivað við vøkstri á 2% árliga.

**Punktgjøld:** Roknað verður við líðandi vøkstri komandi árini. Framskrivað verður við einari árligari hækking á 3 mió. kr.

**Skrásetingargjald:** Rokna verður við, at bilasølan fer at vaksa so líðandi komandi árini. Framskrivað verður við hækking á 2 mió. kr. í 2013, 2014 og 2015. Í 2016 og 2017 verður framskrivað við hækking á 3 mió. kr. árliga.

**Útluting úr Fíggingargrunninum:** Støðan í fíggjargeiranum er soleiðis, at ikki kann roknast við stórum vinningsbýti komandi árini. Men í 2016-2017 verður roknað við størri útluting.

# APPENDIKS 2: RAKSTRAR- OG INNTØKUTILTØK 2013-2017

## § 2 Løgmansfyrisitingin

Rakstrartiltøk árini 2013 til 2017 fyri Løgmansfyrisitingina.

| Nr. | Navn á tiltaki (tkr.) | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Leggja niður sendistovur | | 500 | 1.000 | 1.500 | 1.700 |
| 2 | Aðrar tillagingar | - | - | 200 | 400 | 600 |
| | **Tilsamans** | **-** | **500** | **1.200** | **1.900** | **2.300** |

### 1. Leggja niður sendistovur

***Endamál***
Fyri at røkka eyka áløgdu sparingarnar í 2012 (1 mió. kr.), og sparikrøvini í tíðarskeiðnum 2013 til 2017 er gjørt av at leggja niður sendistovukarmarnar í London. Samstundis verður virksemið, sum hevur verið rikið frá sendistovuni í London, flutt til sendistovuna í Brússel.

***Fíggjarligur virknaður nú og sum frálíður***
Fíggjarligu avleiðingarnar síggjast í talvuni omanfyri.

***Avleiðing***
Virksemið viðvíkjandi Stóra Bretlandi og Írlandi, sum higartil hevur verið røkt úr Londan, verður framyvir røkt úr Brússel. Við hesi loysn verður sendistovan í Brússel styrkt, meðan tað verður nakað truplari at reka sendistovuvirksemið í Stóra Bretlandi og Írlandi.

***Verkseting***
Stig eru longu tikin til at fremja broytingina.

| Nr. | Navn á tiltaki (tkr.) | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Leggja niður sendistovur | | 500 | 1.000 | 1.500 | 1.700 |

### 2. Aðrar tillagingar

***Endamál***
Fyri at røkka eyka áløgdu sparingarnar í 2012 (1 mió. kr.) og sparikrøvini í tíðarskeiðnum 2013 til 2017 er eisini neyðugt at fremja tillagingar í rakstrinum hjá Løgmansskrivstovuni.

***Fíggjarligur virknaður nú og sum frálíður***
Fíggjarligu avleiðingarnar síggjast í talvuni omanfyri.

***Avleiðing***
Leigumál o.a., sum Løgmansskrivstovan kann verða fyri uttan, verða uppsøgd eins og aðrar útreiðslur verða minkaðar.

***Verkseting***

So hvørt sum lýst í talvuni omanfyri.

| Nr. | Navn á tiltaki (tkr.) | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 2 | Aðrar tillagingar | - | - | 200 | 400 | 600 |

## § 3 Fíggjarmál

Rakstrartiltøk árini 2013 til 2017 fyri fíggjarmál.

| Nr. | Navn á tiltaki (tkr.) | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Skipað alment innkeyp | 3.000 | 6.000 | 9.000 | 12.000 | 15.000 |
| 2 | Útbjóðing av løgfrøðiligum tænastum | 500 | 500 | 500 | 500 | 500 |
| 3 | Betri stýring av landsins gjaldføri | 1.000 | 1.000 | 1.000 | 1.000 | 1.000 |
| 4 | Niðurlaging av rentustuðlinum | | | 3.500 | 7.000 | 10.500 |
| 5 | Rationalisering av rakstrinum hjá TAKS | | 500 | 1.000 | 1.000 | 1.500 |
| 6 | Talgildir roknskapir | -1.000 | 1.000 | 1.000 | 1.000 | 1.000 |
| 7 | Umskipan av stovnum og virksemi undir Fíggjarmálaráðnum | 1.000 | 2.000 | 2.000 | 2.000 | 2.000 |
| | **Tilsamans** | **4.500** | **11.000** | **18.000** | **24.500** | **31.500** |

### 1. Skipað alment innkeyp

***Endamál***
Tað eru tvey høvuðsendamál við einum almennum innkeyps- og úboðspolitikki. Tað eina er at fáa mest møguligt fyri pening skattgjaldarans, og hitt er at stimbra kappingina á privata vøru- og tænastumarknaðinum.

***Fíggjarlig effekt nú og sum frálíður***
Seinastu árini hevur landið keypt vørur og tænastur fyri umleið 1,1 mia. kr. árliga. Umleið helmingurin verður keypt til víðari sølu (apoteksverkið og Rúsan) og á marknaðum har bert ein, tveir ella heilt fáir veitarar eru, t.d. el, olja, samskifti, tryggingar, ferðaseðlar o.a.t. Eftir eru sostatt omanfyri 500 mió. kr. til keyp av vørum og tænastum, á marknaðum, har tað er størri kapping.
Partur av hesum góðu 500 mió. kr. verður í dag boðin út, men tað finst eingin uppgerð, sum kann geva eina mynd av, hvussu stórur hesin parturin er. Um vit siga, at hesin parturin er 200 mió. kr., so eru góðar 300 mió. kr. eftir, har peningur kann sparast við skipaðum innkeypi og útbjóðing. Um almenna innkeypið síðan verður skipað við tí endamálið at spara t.d. 5% av hesum góðu 300 mió. kr. í almenna innkeypinum tey næstu fimm árini, so verður árliga sparingin í miðal umleið 3 mió. kr. Hetta merkir, at eftir fimm árum er almenna keypið av vørum, tænastum og øðrum útbúnaði 15 mió. kr. lægri enn nú.

| Nr. | Navn á tiltaki (tkr.) | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Skipað alment innkeyp | 3.000 | 6.000 | 9.000 | 12.000 | 15.000 |

***Avleiðing***
Landið er ein stórur innkeypari á føroyska vøru- og tænastumarknaðinum. Tí má almenna innkeypið skipast við skili, soleiðis at tað almenna ikki bindur seg til ein veitara yvir longri tíð, á marknaðum við fáum veitarum, og soleiðis avlagar kappingina heldur enn at stimbra kappingina.

***Gjøgnumførsla***
Í viðmerkingunum til § 7 í løgtingslógini um landsins játtanarskipan stendur m.a.: "...umframt sparsemi (at neyðug og nøktandi orka verður brúkt til at loysa eina uppgávu, at t.d. útreiðslur til

umboðan eru á einum hóskandi og rímiligum støði, at avsláttarskipanir verða gagnnýtttar, at kostnaðarstøðið fyri fingnar vørur og tænastur verður tryggjað við, at slíkar veitingar við jøvnum millumbilum verða bodnar út, hóast eingin lógaráløgd skylda er til tess...”.

Stovnsleiðarar hjá landinum hava tí skyldu at bjóða út vørur og tænastur, men orðaður er eisini ein almennur útboðs- og innkeypspolitikkur, sum formliga ikki er settur í verk enn. Landsstýrið má sum skjótast taka støðu til, hvussu almenni útboðs- og innkeypspolitikkurin skal setast í verk.

## 2. Útbjóðing av løgfrøðiligum tænastum

***Endamál***

Endamálið við hesum uppskotinum er at spara pening við at bjóða út løgfrøðiligu tænasturnar, sum landið keypir. Hetta uppskotið er tí partur av útboðs- og innkeypspolitikkinum hjá landinum.

***Fíggjarlig effekt nú og sum frálíður***

Seinastu sjey árini hevur landið árliga í miðal keypt fyri 2,5 mió. kr. í løgfrøðiligum tænastum. Landið kann uttan iva spara nakað av peningi við at bjóða løgfrøðiligu tænasturnar út millum føroysku advokatskrivstovurnar. Varisliga verður mett, at landið kann spara umleið 20% árliga í útreiðslunum til løgfrøðiligar tænastur, við at bjóða út hesar tænastur.

| Nr. | Navn á tiltaki (tkr.) | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 2 | Útbjóðing av løgfrøðiligum tænastum | 500 | 500 | 500 | 500 | 500 |

***Avleiðing***

Aðalstjórar og stovnsleiðarar skulu frameftir biðja um tilboð frá fleiri advokatvirkjum, tá ið løgfrøðiligar uppgávur verða bílagdar uttanhýsis.

***Gjøgnumførsla***

Aðalráðini eiga umvegis úbjóðingarpolitikkin hjá landinum at fáa álagt, at bjóða út løgfrøðiligar tænastur. Hetta kann annaðhvørt gerast fyri hvørja uppgávu sær, ella kunnu allar uppgávurnar fyri eitt ávíst tíðarskeið bjóðast út undir einum, t.d í 1 ella 2 ár, soleiðis at tann bíligasta advokatskrivstovan fær allar løgfrøðiligu uppgávurnar fyri ein ávísan stovn í eitt ásett tíðarskeið. Her mugu tó atlit verða tikin fyri, at ávísir advokatar hava servitan á ávísum økjum.

Úbjóðingin av løgfrøðiligu tænastunum má samskipast við tey, sum fáa ábyrgdina av at samskipa og gjøgnumføra almenna útboðs- og innkeypspolitikkin.

## 3. Betri stýring av landsins gjaldføri

***Endamál***

Gjøgnum eina miðvísa gjaldførisstýring kann landið minka um deyða gjaldførið (deyða gjaldførið er óneyðugt gjaldføri, sum stovnarnir hava standandi á peningastovnskontu til eina lága rentu).
Ein betri gjaldførisstýring viðførir jalig viðurskifti, herundir serliga hægri rentuinntøkur og betri roknskaparligt eftirlit við gjaldførinum.

Flestu kontur hjá landinum, sum ikki eru undir ræði hjá Landsbankanum ella Gjaldstovuni fáa bara vanliga foliorentu, sum er millum 0 og 0,1 %, alt eftir peningastovni. Gjaldstovan hevur serliga avtalu, sum ger, at hon fær eina væl hægri rentu fyri innistandandi. Endamálið er antin at at fáa betri

rentu fyri aðrar kontur hjá landinum ella at avroknað verður skjótari og neyvari millum stovnskontur og Gjaldstovuna.

***Fíggjarligan virkna***
Flestu stovnar avrokna regluliga – minst eina ferð um mánaðin - til Gjaldstovuna. Heilt stórar upphæddir eru tí ikki leingi á øðrum kontum enn teimum hjá Gjaldstovuni og Landsbankanum Nøkur undantøk eru tó.

Mett verður, at um aðrar kontur hjá Landskassanum fáa hægri rentur ella avroknast kann meira presist millum Gjaldstovuna og stovnin, kann hetta geva um 1 mió. kr. í hægri rentuinntøku. Vinningurin er størri í tíðum har størri munur er millum foliokontu og avtaluinnlán/lánsbrøv, so hækkandi rentustøði ger tiltakið meira effektivt enn tað er í løtuni. Mett verður, at tiltakið er vert at fara undir.

***Avleiðingar***
Avleiðingin er, at landskassin fær um 1 mió. kr. meira í rentuinntøkum. Negativar konsekvensir væntast ikki.

***Gjøgnumførsla***
Tiltakið kann gjøgnumførast á tveir hættir:

- antin við at Fíggjarmálaráðið fær gjørt eina avtalu fyri allar stóru peningastovnskonturnar hjá landinum, so at hesar kontur geva somu rentu sum rentuna, ið Gjaldstovan fær.
- Ella at stovnarnir gerast betri til at avrokna til Gjaldstovuna. Hetta kundi verið gjørt við at fyri ávísar kontur vera álagdar koncern-internar rentur, t.e. at tað eftir ávísum leisti fer at kosta hjá hesum stovnum at hava gjaldføri tøkt.

| Nr. | Navn á tiltaki (tkr.) | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 3 | Betri stýring av landsins gjaldføri | 1.000 | 1.000 | 1.000 | 1.000 | 1.000 |

## 4. Niðurlaging av rentustuðlinum

***Endamál***
At rentustuðulin, frá og við 2015, lækkar 1% árliga í fimm ár, til hann í 2019 er komin niður á 30%. Parturin hjá kommununum verður óbroyttur 13%, meðan parturin hjá landinum lækkar úr 22% í 2014 og niður í 17% í 2019. Hetta samsvarar betri við býti millum land og kommunur av persónsskattinum.

***Fíggjarlig effekt uppá stutt sikt***
Fyri karmarnar hevði tiltakið bara gjørt mun í 2015, 2016 og 2017. Ein lækking á 1% hevur eina sparing við sær fyri landskassan á eini 3,5 mió. kr. Tiltakið vildi sostatt havt hesa ávirkan:

| Nr. | Navn á tiltaki (tkr.) | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 4 | Niðurlaging av rentustuðlinum | | | 3.500 | 7.000 | 10.500 |

***Fíggjarlig effekt uppá langt sikt***
Frá og við 2019 hevði talan verið um eina sparing á 17,5 mió. kr. árliga.

***Avleiðingar***
Rentustuðulin kann ikki samanberast við skattafrádrátt, tí bústaðurin er skattafríur. Talan er um reinan stuðul til ein samfelagsbólk. Ein minking av stuðlinum hevur tí við sær, at tann mismunur, sum er millum húsaeigarar og tey sum leiga bústað, verður minni.

Ein møgulig avleiðing kann verða, at húsaprísirnir fara at lækka nakað (ella vaksa minni enn teir annars vildu gjørt) og at tað verður nakað dýrari at byggja hús. Keyparar fara neyvan at merkja tann stóra munin; teir kunnu keypa bíligari, men hinvegin vaksa rentuútreiðslurnar tilsvarandi. Mett verður, at við ætlaðu niðurlagingini á 1 %-stig árliga verður minkað mest møgiligt um hesar avleiðingar.

***Gjøgnumførsla***
Lógarbroyting skal gerast í *Løgtingslóg nr. 148 frá 30. desember 1996 um stuðul til rentuútreiðslur av lánum.*

**5. Rationalisering av rakstrinum hjá TAKS**

*(Skal síggjast saman við innlating av talgildum roknskapum tiltak nr. 6.)*

***Endamál:***
Endamálið er rationaliseringar av rakstrinum hjá TAKS. Hetta verður gjørt við talgilding og at gera ávísar broytingar í skattalógini so hon verður einfaldari

Við talgildari undirskrift verður betri møguleiki hjá bæði privatum og vinnuligum at avgreiða síni viðurskifti við almennar stovnar (herundir TAKS) í sjálvavgreiðslum. Harvið verður partur av tí arbeiðinum, sum starvsfólk í dag sita og gera (umaftur), flutt út til brúkaran sjálvan at avgreiða, og harvið minkar manuella arbeiðsbyrðan hjá TAKS.

***Fíggjarlig effekt stutt/longri sigt***
Hóast ein talgild undirkskrift kemur, kann hon ikki nýtast til nakað, uttan so at ein ávís KT-menning verður framd, soleiðis at KT-skipanirnar stuðla uppundir nýtsluna av talgildu undirskriftini. Tí skulu íløgur gerast í KT og fyrimunirnir koma ikki beinanvegin. Tað skal uttan iva ein tilvenjingartíð til áðrenn fólk taka eina talgilda undirskrift til sín, og brúka hana soleiðis, at tað veruliga ger mun hjá TAKS, men sum frálíður fer tað uttan iva at spara arbeiðsorku hjá TAKS.

**Avleiðingar**
Um enn nógv av samskiftinum í dag fer fram elektroniskt, so verða løgfrøðiliga bindandi skjøl sum meginregla send sum bræv. Við eini skipan, við einuri løgfrøðiliga bindandi talgildari undirskrift, ber í prinsippinum til at gera alt samskiftið elektroniskt – eisini tað, sum er av løgfrøðiliga bindandi slag. Hetta merkir, at bæði tað almenna og privatar fyritøkur, við einari talgildari undirskrif, kunnu minka um sínar umsitingarútreiðslur.

Umframt at spara umsiting og pening við tíðini, verður eisini talan um eina munandi betri tænastu fyri borgaran

*Íverksetan*
Arbeitt verður í løtuni við at seta í verk talgilda undirskrift. Fyri at fáa størstu effekt av talgildu undirskriftini, verður neyðugt at "motivera" fólk til at brúka hana so nógv sum til ber.

| Nr. | Navn á tiltaki (tkr.) | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 5 | Rationalisering av rakstrinum hjá TAKS | | 500 | 1.000 | 1.000 | 1.500 |

## 6. Talgildir roknskapir

Roknskapir, ið skulu latast almennum myndugleikum, skulu verða latnir talgilt frá frá og við 1. januar 2014.

*Endamál*
Privatpersónar ið reka vinnuvirki, feløg, grunnar v.m. hava skyldu árliga at senda almennu myndugleikunum avrit av ársrokniskapi teirra. Tað eru serliga TAKS, Hagstova Føroya og Skráseting Føroya, ið skulu hava avrit av ársroknskapum. TAKS og Hagstovan skulu hava avrit av at kalla øllum roknskapum, meðan Skráseting Føroya skal hava avrit roknskapum hjá feløgum. Útyvir nevndu tríggjar stovnar eru eisini aðrir almennir stovnar, sum í ein ávísan mun hava brúk fyri avritum av roknskapum.

Í dag er mannagongdin hon, at fyritøkur taka avrit av roknskapum teirra og senda tey við postinum til almennu myndugleikarnar. Endamálið er at broyta hesa mannagongd, soleiðis at roknskapirnir verða sendir talgilt, og sendir til eina almenna adressu, sum síðan syrgir fyri, at roknskapirnir verða sendir víðari til teir stovnar, ið hava lógarásettan rætt til at fáa avrit av teimum.

***Fíggjarlig effekt stutt/longri sikt***
Ein tílík talgildingsverkætlan hevur ein kostnað við sær at byrja við til KT-menning, men frameftir koma almennu stovnarnir at spara pening, tí at tað frameftir slepst undan nógvum manuellum arbeiði í sambandi við postmóttøku, kopiering, inntøpping og journalisering.

***Avleiðingar***
Umframt at spara almennu stovnunum pening, verður møguligt hjá stovnunum at effiktivisera arbeiði teirra. Í hvønn mun hetta eydnast, veldst um, hvørji krøv verða sett til sjálva innrapporteringina. Vinnufyritøkur sleppa undan at senda ársroknskap teirra til fleiri almennar adressur

***Íverksetingin***
Settur verður ein verkætlanarbólkur at fremja ætlanina, men tá talan er um nógvar áhugabólkar, verður helst eisini neyðugt við einum stýrisbólki at tryggja samskipanina.

Vinnugluggin hjá TAKS kann møguliga nýtast til hetta endamálið. Fyritøkur eru longu í stóran mun vanar við at brúka Vinnugluggan í teirra virksemi, t.d. til eMVG og til eToll.

| Nr. | Navn á tiltaki (tkr.) | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 6 | Talgildir roknskapir | -1000 | 1000 | 1000 | 1000 | 1000 |

## 7. Umskipan av stovnum og virksemi undir Fíggjarmálaráðnum

Sum partur av rationaliserings- og sparitiltøkum landsstýrisins er ætlanin at umskipa stovnar og virksemi undir Fíggjarmálaráðnum við virknaði frá 1. januar 2013.

*Umsiting av gjaldføri landskassans*

Skotið verður upp, at umsiting av gjaldføri landskassans verður flutt til Gjaldstovuna. Sambært Løgtingslóg um landskassans innlán og lán í Landsbankanum umsitur Landsbankin gjaldføri landskassans eftir nærmari sáttmála. Landsbankin fær í samsýning 1 prosent av fíggjarplaseringum landskassans afturfyri. Hetta svarar vanliga til um 20 mió. kr. árliga. Játtan og starvsfólk fylgja við í flytingini frá Landsbankanum til Gjaldstovuna.

*Umsiting av lániskuld landskassans*

Skotið verður upp, at umsitingin av lánum landskassans verður flutt til Gjaldstovuna. Játtan og starvsfólk fylgja við í flytingini frá Landsbankanum til Gjaldstovuna.

*Hagtalsfrøðiligar og búskaparligar kanningar*

Skotið verður upp, at hagtalsfrøðiligu og búskapargreinandi parturin av virkseminum hjá Landsbanka Føroya verður, saman við Hagstovu Føroya, lagt í nýggjan stovn við heitinum ”Telja”. Nýggi stovnurin røkir skrivarauppgávuna fyri Búskaparráðið. Ásetast skal við lóg, at nýggi stovnurin skal vera óheftur. Játtan og starvsfólk fylgja við í samanleggingini av Landsbankanum og Hagstovuni til Telja.

Annar partur av búskapargreinandi virkseminum hjá Landsbankanum skal leggjast til Fíggjarmálaráðið, við tí endamáli, at gera búskapargreiningar av almenna geiranum fyri at styrkja búskettstýringina og harvið úrslitið á fíggjarlógini. Játtan og starvsfólk fylgja við til Fíggjarmálaráðið.

*Onnur viðurskifti*

Stjórin í Landsbankanum er sambært løgtingslóg um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn í stýrinum fyri grunnin, og sambært viðtøkunum umsitur Landsbankin fíggjarognirnar hjá grunnninum. Stjórin í Landsbankanum virkar sum stjóri fyri Virðisbrævamarknað Føroya.

Um loysnirnar undir omanfyri verða framdar, er neyðugt at taka støðu til, hvussu umsitingin av fíggjarognunum hjá AM-grunninum og hvussu virksemi hjá Virðisbrævamarknað Føroya verður skipað frameftir.

Víst verður annars yvirskipað til”Frágreiðing um samanlegging av Landsbanka Føroya og Hagstovu Føroya”, sum Fíggjarmálaráðið lat úr hondum 1. august 2005.

### Møguleikar fyri sparingum

Omanfyrinevndu umskipanir verða mettar at hava við sær rationaliseringar fyri tað almenna. Mett verður, at spart verður tilsamans 1 mió. kr. í 2013 og 2 mió. kr. um árið frá og við 2014.

| Nr. | Navn á tiltaki (tkr.) | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 7 | Umskipan av stovnum og virksemi undir Fíggjarmálaráðnum | 1000 | 2000 | 2000 | 2.000 | 2.000 |

## § 5 Fiskivinnumál

Rakstrartiltøk árini 2013 til 2017 fyri fiskivinnumál.

| Nr. | Navn á tiltaki (tkr.) | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Leggja FVE, MRCC og Tilbúgving saman | 800 | 1.800 | 1.800 | 1.800 | 1.800 |
| 2 | Samskipa Havstovuna og Fróðskaparsetri betri | | 1.000 | 2.000 | 2.500 | 2.500 |
| 3 | Meirinntøkur á Havstovuni | | | | 900 | 1.600 |
| 4 | Leggja skiparakstur saman | | | | | 500 |
| 5 | Uttanhýsis fígging av landbúnaðargransking | | | 500 | 700 | 700 |
| 6 | Automatisering og rationalisering av fiskiloyvisumsiting | | | 400 | 600 | 800 |
| 7 | Meira uttanhýsisfígging til fisikivinnugransking | | 700 | 700 | 700 | 700 |
| | **Tilsamans** | **800** | **3.500** | **5.400** | **7.200** | **8.600** |

### 1. Fiskiveiðieftirlitið, MRCC og Tilbúgvingarstovnurin verða løgd saman.

***Endamál***
Minka um dupultfunktiónir og skipa arbeiðið betur.

***Lýsing***
Á FVE og MRCC eru fleiri fólk, ið ganga vakt. Við at samskipa vaktarætlanirnar átti at borið til at minka um útgoldna yvirtíð og vaktargjald. Vaktgangandi á MRCC og manning á Brimli kunnu arbeiða í rotatión fyri at betra um førleikan og samskifti á báðum økjum. Harumframt verður eisini arbeitt við at umskipa fyrisitingina av fiskiloyvum.

***Avleiðing***
Hetta skuldi ikki fingið negativa ávirkan á tænastuna.

***Fíggjarliga effektin***
Hetta er trupult at meta um, men ein leyslig meting sigur millum 2 - 3 mió. kr. næstu 3 árini. Viðmerkjast skal, at 700 tús. kr. verða spardar longu í 2012.

| Nr. | Navn á tiltaki (tkr.) | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Leggja FVE, MRCC og Tilbúgving saman | 800 | 1.800 | 1.800 | 1.800 | 1.800 |

### 2. Havstovan og Fróðskaparsetrið verða løgd saman ella verða samskipaði betur.

***Endamál***
Minka um dupultfunktiónir og skipa arbeiðið betur.

***Lýsing***
Mett verður, at partar av umsitingini av báðum stovnunum kann minka. Tað arbeiða nógvir granskarar á Havstovuni. Vanligt er, at hesir granskarar eisini undirvísa á Fróðskaparsetrinum.

Henda undirvísingin verður tá goldin sum yvirtíð. Við eini samanlegging av stovnunum verður hetta ein partur av starvið teirra. Um talan einans verður um samskipan verður henda sparingin eitt sindur truplari at gjøgnumføra.

***Avleiðing***
Hetta skuldi ikki fingið neiliga ávirkan á tænastuna.

***Fíggjarliga effektin***
Hetta er trupult at meta um, men ein leyslig meting sigur uml. 2,5 mió. kr. fram til 2017.

| Nr. | Navn á tiltaki (tkr.) | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 2 | Samskipa Havstovuna og Fróðskaparsetri betri | | 1.000 | 2.000 | 2.500 | 2.500 |

## 3. Meirinntøkur til Havstovuna av nýggja havrannsóknarskipinum

***Endamál***
At fáa útlendskar granskarar til Føroyar at granska, og harvið skapa virksemið og førleikamenning í Føroyum.

***Lýsing***
Mett verður, at nýggja havrannsóknarskipið gevur møguleika fyri, at skipið kann leigast út til útlendskar granskingarstovnar, kanska í samstarvi við Havstovuna. Á henda hátt kunnu útlendskir granskingarstovnar verða við til at fíggja partar av rakstrinum hjá nýggja havrannsóknarskipinum.

***Avleiðing***
Hetta skuldi lætt um raksturin av nýggja havrannsóknarskipinum, samstundis sum granskingarførleikin á Havstovuni veksur.

***Fíggjarliga effektin***
Hetta er trupult at meta um, men ein leyslig meting sigur uml. 1,6 mió. kr. fram til 2017.

| Nr. | Navn á tiltaki (tkr.) | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 3 | Meirinntøkur á Havstovuni | | | | 900 | 1.600 |

## 4. Leggja umsitingina av rakstrinum av nýggja Havrannsóknarskipinum til Fiskiveiðieftirliti

***Endamál***
Minka um dupultfunktiónir og skipa arbeiðið betur.

***Lýsing***
Ístaðin fyri at hava skipa umsiting á tveimum støðum, verður umsitingin savnað saman. Mett verður, at partar av umsitingini av báðum stovnunum kann minka. Havstovan bíleggur tímar og nýtslu av skipinum frá Fiskiveiðieftirlitinum. Sostatt kunnu onnur eisini bíleggja skipið móti rokning. Hetta kann sostatt seinni skapa fleiri inntøkur til landskassan. Henda umlegging kann fara fram, tá nýggja skipið kemur til landið.

***Avleiðing***
Hetta skuldi ikki fingið neiliga ávirkan á tænastuna.

***Fíggjarliga effektin***
Hetta er trupult at meta um, men ein leyslig meting sigur uml. 500 tús. kr. fram til 2017.

| Nr. | Navn á tiltaki/ upphæddir í tkr. | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 4 | Leggja skiparakstur saman | | | | | 500 |

## 5. Uttanhýsis fíggjng av landbúnaðargransking

***Endamál***
Vaksa um landbúnaðargranskingina.

***Lýsing***
Í løtuni fer landbúnaðargransking fram á Búnaðarstovuni umvegis játtanina til "almennar royndir". Við umskipanini av Búnaðargrunninum er latið upp fyri, at grunnurin kann lata stuðul til granskingarverkætlanir innan landbúnaðin. Almennar royndir kann tá umskipast til meira at taka ein samskipandi leiklut í landbúnaðargranskingini, meðan fíggingin í størri mun verður uttanfyri landskassan.

***Avleiðingar***
Meira gransking innan landbúnaðin fyri ein lægri kostnað fyri landskassan.

***Fíggjarliga effektin***
Mett verður, at í hvussu er 700 tús. kr. kunnu fáast til vega av uttanhýsis fígging til granskingarverkætlanir.

| Nr. | Navn á tiltaki (tkr.) | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 5 | Uttanhýsis fígging av landbúnaðargransking | | | 500 | 700 | 700 |

## 6. Effektivisering og automatisering av umsitingini av fiskiloyvum

***Endamál***
Automatisera og effektivisera umsitingina av fiskiloyvum.

***Lýsing***
Verkætlan verður sett í gongd at effektivisera og automatisera fiskiloyvisumsitingina. Hetta fevnir um fleiri átøk:

- Gera lógarverkið einfaldari at umsita
- Leggja umsiting av fiskiloyvum til Fiskiveiðieftilitið
- Arbeiða móti at gera tað møguligt hjá fiskimonnum og reiðarum fyri sjálvavgreiðslu

***Avleiðing***
Hetta skuldi betra um tænastuna.

***Fíggjarliga effektin***

Hetta er trupult at meta um, men ein leyslig meting sigur at 800 tús. kr. kunnu sparast fram til 2017. At sparingin í fyrstu syfti ikki verður størri, kemst av, at nakrar útreiðslur stava frá hesi umlegging – m.a. skulu KT-skipanir gerast til endamálið.

| Nr. | Navn á tiltaki (tkr.) | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 6 | Automatisering og rationalisering av fiskiloyvisumsiting | | | 400 | 600 | 800 |

## 7. Uttanhýsis fígging av fiskivinnugransking

***Endamál***

Umskipa fiskivinnugranskingina.

***Lýsing***

Í løtuni fer fiskivinnugrnasking fram umvegis játtanina til fiskivinnuroyndir. Mett verður, at møguligt er at vaksa um fremmandafíggingina av granskingarverkætlnunum.

***Avleiðingar***

Meira gransking innan fiskivinnuna fyri ein lægri kostnað fyri landskassan.

***Fíggjarliga effektin***

Mett verður, at í hvussu er 700 tús. kr. kunnu fáast til vega av uttanhýsis fígging til granskingar-verkætlanir.

| Nr. | Navn á tiltaki (tkr.) | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 7 | Meira uttanhýsisfígging til fisikivinnugransking | | 700 | 700 | 700 | 700 |

## § 6 Vinnumál

Rakstrartiltøk árini 2013 til 2017 fyri vinnumál.

| Nr. | Navn á tiltaki (tkr.) | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Vinnustýrið, samanlegging av stovnum | 500 | 2.000 | 2.000 | 2.000 | 2.000 |
| 2 | Miðsavna raksturin av skipaflotanum hjá landinum (Landsreiðaríð) | 1.000 | 4.000 | 5.000 | 5.000 | 5.000 |
| 3 | Strandfaraskip landsins, samskipan, umframt nýggj ferga | 2.800 | 3.900 | 5.000 | 5.000 | 5.000 |
| 4 | Orkudepil Kambsdalur | -1.400 | | | | |
| | **Tilsamans** | **2.900** | **9.900** | **12.000** | **12.000** | **12.000** |

### 1. Vinnustýrið

Vinnumálaráðið arbeiðir miðvíst við at rationalisera raksturin av málsøkinum hjá Vinnumálaráðnum. Í 2010 bleiv sjóvinnuøkið skipað í ein stovn, nevndur Sjóvinnustýrið. Í 2011 blivu Heilsufrøðiliga starvsstovan og Arbeiðseftirlitið løgd saman, í 2012 verða eftirlitini á Skálatrøð, Skráseting Føroya, Kappingareftirlitið og Jarðfeingi samanløgd í ein stovn, sum eftir ætlan verður nevndur Vinnustýrið.

Tað eru ikki gjørdar endaligar útrokningar fyri hvat samanleggingin viðførur av rationalseringum í umkostningum, tí er talan um eina meting. Væntast kann, at niðurlegging av dupultfunktiónum, samanlegging av KT-skipanum, journal v.m. viðføra sparingar, umframt sparing í leiguútreiðslum. Tað eru bert Kappingareftirlitið, Ferðaráð Føroya og Jarðfeingi sum verða fíggjað/partvís fíggja úr landskassanum, hinir stovnarnir eru útreiðsluneutralir.

Ætlanin er at samanleggingin verður í juli 2012, av tí at hølini til nýggja stovnin ikki verða klár fyrr enn (eftir ætlan) februar 2013, fær fíggjarliga effektin ikki fulla effekt fyrr enn í 2014.

Mett verur at samlaða fíggjarliga effektin verður 1.500 til 3.000 kr., harav ein lutvísur partur fer til eftirlitsstovnarnir, sum eru fíggjaðir við at vinnan endurrindar stovnunum útreiðslurnar. Sostatt fær vinnan beinleiðis ágóða av samanleggingini, sum alt annað líka viðførur til hægri avkast hjá vinnuni, harav ein partur fellur til landskassan bæði sum mvg og P/F skattur, metingar eru ikki gjørdar av hesum avleiddu inntøkunum.

| Nr. | Navn á tiltaki (tkr.) | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Vinnustýrið, samanlegging av stovnum | 500 | 2.000 | 2.000 | 2.000 | 2.000 |

### 2. Miðsavna raksturin av skipaflotanum hjá landinum (“Landsreiðarí”)

Dagligi raksturin av skipum hjá landinum verður í dag samskipaður í fleiri eindum (Fiskirannsóknarstovan, Vaktar- og Bjargingartænastan og Strandfaraskip Landsins). Hesin rakstur átti at verið miðsavnaður, fyri at gagnnýta stórrakstrarfyrimunir og vitan.

Hetta viðførur sparing innan teknisku umsitingina av skipunum, innkeyp av eykalutum og olju v.m. kann samskipast og harvið gerast rationellari, manningarnar gagnnýtast betur umframt umsiting av manning kann samskipast betur osfr.

Um undirtøka er fyri samanleggingini, kann hetta gjøgnumførast í 2012, fíggjarligu avleiðingarnar verða at síggja í 2013, 2014 og 2015.

Mett verður at sparingin kann verða:

| Nr. | Navn á tiltaki (tkr.) | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 2 | Miðsavna raksturin av skipaflotanum hjá landinum (Landsreiðaríð) | 1.000 | 4.000 | 5.000 | 5.000 | 5.000 |

## 3. Strandfaraskip Landsins samskipa og nýggj ferga.

Smyril er sum kunnugt kostnaðarmikil í rakstri, um veturin siglur Smyril 3 túrar t/r um dagin einaferð um vikuna, um summari er hetta 3 túrar t/r 2 ferðir um vikuna. Um hesin 3. túrur t/r, verður tikin burtur, viðførur hetta eina sparing á 1,8 mió. kr. um árið.

Hetta kann gjørnumførast við stuttari freist og verður fíggjarliga avleiðingin at síggja beinanvegin.

Teistin: Um síðsti túrurin verður tikin burtur, verður árliga sparing 2,1 mió. kr. 1 mió. kr í 2013 og 1,1 mió. kr. afturat í 2014.

Nýggj Nólsoyar ferja kemur í rakstur í 2015, hetta viðførur eina sparing í rakstrinum á 1,1 mió. kr.

| Nr. | Navn á tiltaki (tkr.) | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 3 | Strandfaraskip landsins, samskipan, umframt nýggj ferga | 2.800 | 3.900 | 5.000 | 5.000 | 5.000 |

## 4. Orku- og Granskingardepil á Kambsdali

Orku- og Granskingardepilin á Kambsdali hevur til endamáls at granska í orkuloysnum, og at menna vitan um, hvussu til ber at nøkta allan orkutørv í einum øki við varandi orku. Hetta verður gjørt í samspæli millum ymsar varandi orkukeldur- og orkugoymslir, kunningartøkni og eisini bygningar, so at húsini eisini kunnu gerast orkuframleiðarar.
Orkuloysnirnar á Kambsdali skulu kunna uppskalerast beinleiðis, og integrerast í føroyska samfelagið – eisini útoyggjarnar.

| Nr. | Navn á tiltaki (tkr.) | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 4 | Orku- og Granskingardepilin á Kambsdali | -1.400 | | | | |

## § 7 Mentamál

Rakstrartiltøk árini 2013 til 2017 fyri mentamál.

| Nr. | Navn á tiltaki (tkr.) | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Fólkaskúlin, størri kommunueindir | 2.000 | 4.000 | 8.000 | 12.000 | 16.000 |
| 2 | Miðnámsskúlar, íverksetan av nýggjari yrkisútbúgvingarskipan | 1.000 | 3.700 | 6.000 | 9.000 | 9.000 |
| 3 | Skipa skúladeplar fyri miðnámsútbúgvingar, Marknagil, Kambsdal og Klaksvík | | | 2.000 | 4.000 | 8.000 |
| 4 | Strika ES-granskingarluttøkuna aftaná 2013 | | 9.700 | 9.700 | 9.700 | 9.700 |
| 5 | Fróðskaparsetrið | 1.000 | 1.000 | 1.500 | 1.500 | 1.500 |
| 6 | Ymiskar tillagingar verða gjørdar í lestrarstuðulsskipanini | 2.000 | 6.000 | 6.500 | 7.500 | 8.000 |
| 7 | Aðrar játtanir á grein 7 | 3.300 | 3.800 | 4.500 | 4.500 | 4.500 |
| 8 | Stuðul til oyggjaleikir/ítróttur | | | -2.000 | -4.000 | |
| | **Tilsamans** | **9.300** | **28.200** | **36.200** | **44.200** | **56.700** |

### 1. Fólkaskúlin, størri kommunueindir/-skúlaeindir, ein fyritreyt

***Endamál***
Endamálið er at bjóða somu undirvísing fyri lægri kostnað.

***Fíggjarlig ávirkan***
Kommunurnar hava í dag ábyrgdina av skúlabygnaðinum, t.v.s. hvussu nógvir skúlar eru, hvar næmingar verða skrivaðir inn o.a. Við verandi skipan tillutar Mentamálaráðið tímar til flokkar í einstøku skúlunum, har allir flokkar sambært lóg eru tryggjaðir eitt ávíst minstatal av tímum. Hetta hevur ført við sær nógvar skúlaeindir við smáum flokkum. Talan er tí um eina lutfalsliga dýra skipan. Við einum meira hóskandi skúlabygnaði ber til at veita næmingunum líka góða undirvísing fyri eina lægri játtan.

***Avleiðing***
Umskipan av galdandi skúlabygnaði, ið førir til færri og størri flokkar, vil gera tað møguligt at skerja tímatalið til skúlarnar, uttan at nerva dygdina. Ein broytt skipan, fer tó ikki at raka skúlar á útoyggj.

***Framfer***
Við størri kommunalum eindum ber betur til at fyrireika broytingar í fólkasklúlalógini og fólkaskúlabygnaðinum, soleiðis, at tímar kunnu verða tillutaðir til størri skúlaeindir, t.d. í mun til, hvussu nógvir næmingar eru í hvørjari kommunu, har kommunan ger av, í hvørjum hølum undirvíst verður í.

| Nr. | Navn á tiltaki (tkr.) | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Fólkaskúlin, størri kommunueindir | 2.000 | 4.000 | 8.000 | 12.000 | 16.000 |

## 2. Miðnámsútbúgvingar

***Endamál***

Endamálið er at seta í verk eina eindarskipan, sum í stuttum kann sigast at vera ein samanrenning av verandi yrkisútbúgvingarskipan og SIT-skipanini. Endamálið við hesi tillaging er at gera færri og longri skúlaskeið og leggja tey í fastari karmar. Endamálið er eisini at menna eina liðiliga skipan, sum bæði er støði undir yrkisútbúgving og gevur møguleika til víðari lesnað.

***Fíggjarlig ávirkan***

Til ber at spara við at fara frá verandi skiftisskipan til eina eindarskipan fyri yrkisútbúgvingarnar.

***Avleiðing***

Verandi skipan er lagað so, at øll tey fyrstu skúlaskeiðini fyri lærlingar verða samlisin við SIT1. Nýggja eindarskipanin verður sett í verk í august 2013. Teir lærlingar, ið eru byrjaðir, gera seg lidnar eftir gomlu skipanini.

***Framfer***

Fyritreytin fyri sparingunum er, at lógaruppskotið um broyting í SIT-lógini, ið liggur í tinginum, verður samtykt.

| Nr. | Navn á tiltaki (tkr.) | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 2 | Miðnámsskúlar, íverksetan av nýggjari yrkisútbúgvingarskipan | 1.000 | 3.700 | 6.000 | 9.000 | 9.000 |

## 3. Skipa skúladeplar fyri miðnámsútbúgvingar

***Endamál***

Uppskot um eina nýggja gymnasiala útbúgvingarskipan liggur í tinginum, har lagt er upp til størri samrakstur millum útbúgvingarskipanir/-breytir. Við ætlaðu deplunum fer at bera til at hava ein skynsamari rakstur.

***Fíggjarlig ávirkan***

Nýggja skipanin og deplarnir gera tað møguligt at fara undir sparingar innan fyrisiting og at skipa útbúgvingarnar effektivari.

***Avleiðing***

Talan verður um eina liðiligari skipan, so tilfeingið kann verða betri gagnnýtt

***Framfer***

Farið verður undir nýggju gymnasialau skipanina frá 2013. Mett verður, at farast kann undir tillagingar, sum kunnu føra til sparingar frá 2015.

| Nr. | Navn á tiltaki (tkr.) | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 3 | Skipa skúladeplar fyri miðnámsútbúgvingar, Marknagil, Kambsdal og Klaksvík | | | 2.000 | 4.000 | 8.000 |

## 4. Strika ES-granskingarluttøkuna aftaná 2013

*Endamál*
Verandi FP 7 granskingarskráin endar í 2013. Nú er komið fram, at í uppskotinum til reglugerð fyri nýggju granskingarskránna Horizon 2020, sum ES-Kommissiónin hevur lagt fyri Evropatingið og Ráðið, er ikki longur møguleiki fyri føroyskum at-limaskapi.

Arbeitt verður við at fáa reglugerðina broytta, soleiðis at vit framhaldandi hava møguleika fyri sjálvi at gera av, um vit vilja vera við í ES-granskingarsamstarvinum.

*Fíggjarlig ávirkan*
Limagjaldið, ið er framskrivað í karminum, verður tí fyribils strikað.

*Framfer*
Broytingin hevur virknað frá 2014 og frameftir.

| Nr. | Navn á tiltaki (tkr.) | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 4 | Strika ES-granskingarluttøkuna aftaná 2013 | | 9.700 | 9.700 | 9.700 | 9.700 |

## 5. Fróskaparsetrið

*Endamál*
Fyri at halda karmin er neyðugt við rationaliseringum á øllum økjum.

*Avleiðing*
Neyðugt verður við tillagingum í fyrisitingini og at samskipa lesturin betur, soleiðis at sparingin ikki rakar útbúgvingarvirksemið.

*Framfer*
Sparingin hevur virknað frá 2013 og frameftir.

| Nr. | Navn á tiltaki (tkr.) | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 5 | Fróðskaparsetrið | 1.000 | 1.000 | 1.500 | 1.500 | 1.500 |

## 6. Ymsar tillagingar í lestrarstuðulsskipanini

*Endamál*
Roynt verður at tálma vaksandi útreiðslurnar, tó so at hesar sum minst raka tey lesandi.

*Lýsing*
Ætlanin er at umleggja ÚSUN-skipanina, soleiðis at ein partur av studninginum verður lagdur um til lán. Lánið skal rindast aftur, um so er, at tey lesandi, eftir eitt áramál, ikki koma heimaftur. Ætlanin er eisini at broyta treytirnar hjá teimum 18-19 ára gomlu miðnámsskúlanæmingunum, ið leiga. Haraftrat verður stuðulstíðarskeiðið stytt til at fevna um ásetta lestrartíð.

*Avleiðingar*
Lesandi, ið lesa uttanfyri Føroyar á útbúgvingarstovnum, har talan er um stórt skúlagjald, verða eggjað at flyta heimaftur. Aðrar ætlaðar broytingar skerpa krøvini til útibúgvandi miðnáms-skúlanæmingar, og eggja lesandi til at gera lesturin lidnan til ásettu tíð.

*Fíggjarlig ávirkan*
Vøksturin til lestrarstuðul komandi árini verður tálmaður.

*Framfer*
Umrøddu sparingar fáa virknað frá august 2013.

| Nr. | Navn á tiltaki (tkr.) | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 6 | Ymiskar tillagingar verða gjørdar í lestrarstuðulsskipanini | 2.000 | 6.000 | 6.500 | 7.500 | 8.000 |

## 7. Aðrar játtanir á grein 7

*Endamál*
Effektiviseringar og sparingar.

*Lýsing*
Gjørdar verða tillagingar í rakstrar- og stuðulsjáttanum.

*Avleiðing*
Neyðugt verður at tillaga ætlaða virksemið til eina lægri játtan.

*Fíggjarlig ávirkan*

| Nr. | Navn á tiltaki (tkr.) | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 7 | Aðrar játtanir á grein 7 | 3.300 | 3.800 | 4.500 | 4.500 | 4.500 |

*Fíggjarlig ávirkan*
Í talvuni niðanfyri eru ætlaðu sparingarnar greinaðar á høvuðsbólkar.

| | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Aðrar játtanir á grein 7** | **3.300** | **3.800** | **4.500** | **4.500** | **4.500** |
| Ymsar útreiðslur 7.23.1 | 1.000 | 1.000 | 1.000 | 1.000 | 1.000 |
| Skapandi og útinnandi virksemi 7.24.2 | 1.300 | 1.300 | 2.000 | 2.000 | 2.000 |
| Mentanararvur 7.24.3 | 1.000 | 1.000 | 1.000 | 1.000 | 1.000 |
| Kirkjan 7.24.5 | | 500 | 500 | 500 | 500 |

## 8. Stuðul til oyggjaleikir/ítróttur

***Endamál***

Oyggjaleikir vóru í Føroyum í 1989. Arbeitt hevur verið í fleiri ár fyri at fáa oyggjaleikatiltakið aftur til Føroyar. Sum ein liður í at stuðla fyrireikingararbeiðinum her heima, er stuðul settur av til endamálið.

***Lýsing***

Fyri at kunna hava oyggjaleikir aftur í Føroyum, má nógv fyrireikingararbeiði gerast, serliga eru tað ítróttaannlegg, ið mugu gerast av nýggjum ella mennast, soleiðis at tey lúka tær treytir, ið verða settar av Oyggjaleikanevndini til slíkar karmar. Játtanin er ætlað til slík endamál.

***Avleiðingar***

Tað fer at hava eina mennandi ávirkan á alt okkara ítróttarøki at fáa oyggjaleikir aftur til Føroyar.

***Fíggjarlig ávirkan***

Stuðulin er hugsaður sum ein stuðul til ein Oyggjaleikagrunn, ið skal fyrireika ítróttaøki her heima at verða karmar um komandi oyggjaleikir  í Føroyum.

***Framfer***

Stuðulin verður veittur í 2015 og 2016, soleiðis at fyrireikingararbeiðið verður liðugt í góðari tíð.

| Nr. | Navn á tiltaki (tkr.) | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 8 | Stuðul til oyggjaleikir/ítróttur | - | - | -2.000 | -4.000 | - |

## § 11 Heilsumál

Rakstrartiltøk árini 2013 til 2017 fyri heilsumál.

| Nr. | Navn á tiltaki (tkr.) | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Umlegging av heilsuverkinum | 1.600 | 12.100 | 19.200 | 28.000 | 33.600 |
| 2 | Samanlegging av stovnum á primera heilsuøkinum | 0 | 500 | 500 | 500 | 500 |
| 3 | Serviðgerð uttanlands DRG, styrkt eftirlit og heimtøkur | 3.000 | 4.000 | 4.000 | 4.000 | 4.000 |
| 4 | Umsiting av heilsutrygdarveitingum | -2.000 | 500 | 3.000 | 3.000 | 3.000 |
| 5 | Søla av upplýsingum og tænastum hjá Ílegusavninum | 500 | 1.000 | 2.000 | 3.000 | 5.000 |
| 6 | Koppseting av pensjónistum samskipast. | 500 | 500 | 500 | 500 | 500 |
| 7 | Heilivágsframleiðslu-útflutningur | 0 | 0 | 500 | 1.000 | 2.000 |
| | **Tilsamans** | **3.600** | **18.600** | **29.700** | **40.000** | **48.600** |

### 1. Umlegging av virkseminum í Heilsuverkinum

***Endamál***

At skerja tær "dupultfunktiónir", sum í dag eru á sjúkahúsunum, uttan at tænasturnar verða niðurlagdar í Føroyum. Talan er í høvuðsheitum um størv og keyp av tólum, men eisini aðrar rakstrarútreiðslur eru við. Harumframt verður lagt upp til at viðgera heilsuverkið í síni heild.

***Fíggjarlig effekt stutt/longri sikt***

Eftir ætlan skal umleggingin hava við sær meira skynsama nýtslu av tilfeinginum í heilsuverkinum. Arbeiðið, hvussu hendan umleggingin skal fremjast, er júst byrjað. Hetta verður væntandi eitt stórt og torført arbeiði, sum skal skipast væl. Heilsumálaráðið metir tí, at veruligar sparingar ikki eiga at kunna heintast inn fyrr enn í 2015, og at tann fulli ágóðin ikki fyrr enn í 2017. Orsakað av kravinum um sparingar verður talan um stórar avbjóðingar beinanvegin fyri at røkka málinum.

***Avleiðingar***

Funksjónir og harvið arbeiðspláss verða flutt ímillum ymsu partarnar í heilsuøkinum. Hetta hevur við sær, at onkur starvsfólk fáa aðrar uppgávur, og at samlaða starvsfólkatalið má lækka. Hugsast kann eisini, at nakrir borgarar fara at hava eitt sindur longri ferðing til og frá ávísum viðgerðum. Fakliga tænastan kann tó í minsta lagi væntast at vera á sama støði sum í dag, og borgararnir fáa eina meira líka atgongd til tænastuna. Fyri at tryggja at tænastan skal vera á nóg góðum stigi kann ein møguleiki verða at taka brúkaragjøld fyri tænastur á heilsuøkinum.

***Gjøgnumførsla***

Miðað verður fram ímóti, at arbeiði við umleggingini byrjar beinanvegin, og at ein fyribils niðurstøða verður tøk innan eitt hálvt ár. At seta í verk umleggingina eftir einum skipaðum leisti, tekur eisini tíð. Sparingarnar av umleggingini komandi árini verða soleiðis:

| Nr. | Navn á tiltaki (tkr.) | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Umlegging av heilsuverkinum | 1.600 | 12.100 | 19.200 | 28.000 | 33.600 |

## 2. Samanlegging av stovnum á primera heilsuøkinum

*Endamál*
At samskipa økið betur við tí endamáli, at borgarin fær eina betri tænastu og eisini fær meira burturúr tí tilfeingi, sum verður nýtt til hesar tænastur.

***Fíggjarlig effekt stutt/longri sikt***
Tann fíggjarliga sparingin verður mett til 500 tús. kr. um árið. Samanleggingin skal gerast eftir eini skipaðari tilgongd og fær tí ikki virknað fyrr enn í 2014.

***Avleiðingar***
Starvsfólkaorkan verður tillagað, og møguliga skulu starvsfólk broyta arbeiðsstað.

***Gjøgnumførsla***
Samanleggingin skal gerast eftir eini skipaðari tilgongd og fær tí ikki virknað fyrr enn í 2014.

| Nr. | Navn á tiltaki (tkr.) | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 2 | Samanlegging av stovnum á primera heilsuøkinum | 0 | 500 | 500 | 500 | 500 |

## 3. Serviðgerð uttanlands DRG, styrkt eftirlit og heimtøkur

*Endamál*
At styrkja eftirlitið við teimum heilsutænastum, sum keyptar verða uttanlands og at skipa fleiri heimtøkur. Hetta fyri at fáa sum mest burturúr játtanini á økinum.

***Fíggjarlig effekt stutt/longri sikt***
Væntast kann, at fíggjarligar avleiðingar av tí arbeiði, sum longu er gjørt á økinum, fara at vísa seg í 2012, og ætlanin er so at økja um sparingarnar so við og við.

***Avleiðingar***
At fáa betri avtalur við sjúkrahús uttanlands, at styrkja eftirlitið og skipa fyri heimtøkum, hevur ikki neiligar avleiðingar. Væntast kann tó, at kravið um lækkaðan játtanarkarm krevur at raðfest verður soleiðis, at ikki allar tænastur á hesum øki verða ein møguleiki. Hetta ávirkar tænastuna til sjúklingarnar.

***Gjøgnumførsla***
Avtala er longur gjørd við Region Hovedstaden um DRG-avrokning av føroyskum sjúklingum frá 1. januar 2012. Eftirlitið við serviðgerðini uttanlands varð umskipað og styrkt í 2011 og arbeiðið heldur fram í 2012. Sjúkrahúsini koma javnan við uppskotum um fleiri heimtøkur.

| Nr. | Navn á tiltaki (tkr.) | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 3 | Serviðgerð uttanlands DRG, styrkt eftirlit og heimtøkur | 3.000 | 4.000 | 4.000 | 4.000 | 4.000 |

## 4. Umsiting av heilsutrygdarveitingum

*Endamál*
At umskipa umsitingina av heilsutrygdarveitingum soleiðis, at tað verður bíligari og effektivari at reka. Fyrsta stigið varð tikið, tá ið umsitingin hjá sjúkrakassunum varð savnað í ein stovn, Heilsutrygd. Annað stigið verður at fremja fleiri rationaliseringar av umsitingini av heilsutrygdar-veitingum. Ein partur av hesum verður, tá ið meginparturin av heilsutrygdargjaldinum fer at verða kravt inn umvegis skattaskipanina.

*Fíggjarlig effekt stutt/longri sikt*
Umleggingin skal gerast eftir einum skipaðum leisti og kann tí ikki væntast at fáa virknað fyrr enn í 2014/15.

*Avleiðingar*
Lógarbroyting krevst, fyri at broytingin skal kunna fremjast.

*Gjøgnumførsla*
Ætlanin er at fara undir arbeiðið at talgilda størsta partin av virkseminum á stovninum og at leggja eftirlitið við Heilivágstilskotsskipanini til Apoteksverkið. At fáa eina slíka skipan verður mett at kosta um 2 mió. kr.

| Nr. | Navn á tiltaki (tkr.) | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 4 | Umsiting av heilsutrygdarveitingum | -2.000 | 500 | 3.000 | 3.000 | 3.000 |

## 5. Ílegusavnið, eginfíggjaður rakstur

*Endamál*
At fáa inntøkur til at fíggja virksemið hjá stovninum, soleiðis at landið fær ein part av síni íløgu í skipanina aftur.

*Fíggjarlig effekt stutt/longri sikt*
Roknað verður við, at við at seta fokus á inntøkurnar, kann ein munandi fíggjarlig úrtøka væntast í framtíðini. Í ætlanini fyri 2012 verður roknað við 650 tús. kr. í inntøkum.

*Avleiðingar*
Ílegusavnið skal í størri mun arbeiða við marknaðarføring og sølu av upplýsingum og tænastum, ikki minst til útflutnings.

*Gjøgnumførsla*
Miðað verður fram ímóti, at inntøkurnar skulu økjast tey næstu árini soleiðis:

| Nr. | Navn á tiltaki (tkr.) | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 5 | Søla av upplýsingum og tænastum hjá Ílegusavninum | 500 | 1.000 | 2.000 | 3.000 | 5.000 |

## 6. Koppseting – Samskipa tilboðið um ókeypis koppseting fyri beinkrím til fólk eldri enn 66 ár.

*Endamál*
At samskipa tænastuna, soleiðis at útreiðslurnar til skipanina lækka

*Fíggjarlig effekt stutt/longri sikt*
Útreiðslur til ókeypis koppseting fyri influensa til fólk eldri enn 66 ár eru mettar at vera 1 mió. kr. Miðalkostnaðurin fyri hvørja veiting er um 220 kr. Um veitingin verður samskipað verður roknað við, at tað ber til at lækka játtanina til hesa koppseting til 500 tús. kr.

*Avleiðingar*
Skerjingin kann hava við sær, at persónar, eldri enn 66 ár, ikki longur sjálvir kunnu avgera hvar og júst nær teir kunnu koppsetast. Ein avleiðing kann vera, at pensjónistar ikki velja at lata seg koppseta og tískil kunnu fáa influensu. Harvið kann størri trýst verða lagt á kommunulækna-tænstuna og sjúkrahúsini.

*Gjøgnumførsla*
Galdandi kunngerð á økinum má broytast fyri at tiltakið kann gjøgnumførast. Vanliga verður byrjað at koppseta fyri influensu fyrst í oktober mánað. Til ber at fara undir at fyrireika tiltakið beinan-vegin.

| Nr. | Navn á tiltaki (tkr.) | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 6 | Koppseting av pensjónistum samskipast. | 500 | 500 | 500 | 500 | 500 |

## 7. Heilivágsframleiðslu-útflutningur

*Endamál*
Endamálið við hesum tiltakinum er at fíggja part av rakstrinum hjá Apoteksverkinum við at útflyta heilivági, sum er framleiddur í Føroyum.

*Fíggjarlig effekt stutt/longri sikt*
Framleiðsludeildin hjá Apoteksverkinum verður væntandi liðug at taka í brúk í 2013. Hetta gevur møguleika fyri framleiðslu undir altjóða góðkendum umstøðum. Eitt av málunum við umbyggingini av framleiðsludeildini hevur verið at fáa umstøður, soleiðis at heilivágur kann útflytast. Fyri-spurningar hava verið úr Íslandi, Danmark og Noreg um at keypa heilivág, sum er framleiddur í Føroyum. Væntað verður, at tað fer at taka nakað av tíð at byggja ein marknað upp. Upphæddirnar, sum eru nevndar í talvuni niðanfyri, eru nettoúrslit av átakinum. Starvsfólka- og tilfarsútreiðslur fara at verða í sambandi við hesa alternativu inntøkuna. Ein varislig meting er, at nettoúrslitið kann byggjast upp árini frá 2015 til 2017 frá 500 tús. kr. í yvirskoti til 2 mió. kr. í yvirskoti.

*Avleiðingar*
Átakið hevur positivar avleiðingar fyri apoteksverkið, sum kann brúka sína vitan og framleiðslu-tøkni til at fíggja partar av rakstrarútreiðslunum.

***Gjøgnumførsla***

Ásetast kann í fíggjarlógini, at apoteksverkið skal hava hesa nettoinntøkuna av útflutningi av heilivági. Landsapotekarin fær ábyrgd av at skipað virksemið soleiðis, at málið verður rokkið.

| Nr. | Navn á tiltaki (tkr.) | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 7 | Heilivágsframleiðslu-útflutningur | 0 | 0 | 500 | 1.000 | 2.000 |

## § 12 Almannamál

Rakstrartiltøk árini 2013 til 2017 fyri almannamál.

| Nr. | Navn á tiltaki (tkr.) | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Dagpeningaskipanin - hera kravið um rætt til dagpening | 2.300 | 2.300 | 2.300 | 2.300 | 2.300 |
| 2 | Tillagan av pensjónsskipanini | 33.000 | 37.000 | 41.000 | 85.000 | 90.000 |
| 3 | Fyrtíðarpensjón: "Gensidigt udelukkende ydelser", sum dagpening e.a. | 10.000 | 10.000 | 10.000 | 10.000 | 10.000 |
| 4 | Eldrarøkt, niðurleggja 8 pláss á røktardeildini á Klaksvíkar ellis- og røktarheimi, tá nýggja ellis og røktarheimið letur upp | 1.600 | 3.600 | 3.600 | 3.600 | 3.600 |
| 5 | Eldrarøkt nýggj tøkni | 1.500 | 2.000 | 2.000 | 2.000 | 2.000 |
| 6 | Umskipað ótíðarhóskandi sambýli til dagtilhald, ella onnur tilboð, og umskipan innanfyri leiðsluna/virksemið í eldrarøktini | 3.900 | 8.000 | 10.200 | 10.200 | 10.200 |
| | **Tilsamans** | **52.300** | **62.900** | **69.100** | **113.100** | **118.100** |

### 1. Dagpeningaskipanin – herða kravið um rætt til dagpening

*Endamál*
Í verandi skipan er kravið um tilknýti til arbeiðsmarknaðin fyri at vera fevndur av dagpeninga-skipanini ógvuliga lágt. Tann, ið seinastu 5 vikurnar hevur verið í arbeiði í minst 20 tímar, hevur rætt til dagpening frá 1. fráverudegi, og t.v.s. at tað er gjørligt, at fáa sjúkradagpening vegna sjúku í 9 mðr. bert við at hava verið fáar tímar til arbeiðis.

Í Danmark er kravið, at man undan sjúkrafráveruni skal hava havt tilknýti til arbeiðsmarknaðin í minsta lagi 13 vikur, og skal hava arbeitt í 120 tímar. Hetta kravið verður hert til ávikavist 26 vikur og 240 tímar.

Í Føroyum er sostatt møguleiki, at herða kravið um tilknýti arbeiðsmarknaðin til 80 tímar seinastu 5 vikurnar.

Eisini er møguligt at avmarka rættin hjá fyritíðarpensjónistum (ftp) til dagpening. Í verandi skipan hava ftp sama rætt til sjúkradagpening sum øll onnur – t.v.s. í 9 mðr. Ftp hava fingið tillutað sína pensjón orsaka av niðursettum arbeiðsføri. Tað kann sostatt vera av somu orsøk, at hesi eisini kunnu fáa kompensasjón úr dagpeningaskipanini.

Fíggjarligu viðurskiftini hjá fyritíðarpensjónistum eru batnað munandi seinnu árini, samstundis sum treytirnar hjá teimum, sum hava inntøku aftrat pensjónini, eisini eru blivin munandi betri. Ikki fyrr enn inntøkan fer upp um 90.600 kr./ár, svarandi til 7.550 kr./mðr. byrjar mótrokningin í pensjónini. Inntøka, sum fer upp um inntøkumarkið, verður mótroknað við 30 %. T.v.s. at hóast rætturin til sjúkradagpening verður avmarkaður, so fara hesi í flestu førum at varðveita fulla pensjón í tíðini tey eru sjúkrameldað.

Møguleiki er at gera mun millum ymsu pensjónsstigini – t.d. at hægstu ftp ikki hava rætt til dagpening, meðan miðal og lægstu ftp fáa rætt til dagpening í 20 vikur, svarandi til helvtina av tíðarskeiðinum, sum onnur hava rætt til (soleiðis er í Danmark).

***Fíggjarlig effekt stutt/longri sikt***
Sbrt. eini meting, sum Almannamálaráðið gjørdi fyri 2-3 árum síðani, høvdu útreiðslur landskassans lækkað við uml. 1,8 mió. kr. árliga, um hægstu ftp høvdu mist rættin til dagpening, og miðal og lægstu ftp høvdu havt rætt til dagpening í 20 vikur. Harumframt merkir herda kravið um tilknýti til arbeiðsmarknaðin eisini eina sparing fyri landskassan. Við verandi hagtalsgrundarlagi er tó ikki gjørligt at meta um fíggjarligu avleiðingarnar av herda kravinum, men lagt er upp fyri at 0,5 mió.kr. kunnu sparast árliga.

***Avleiðingar***
Avleiðingin vil í flestu førum merkja, at fyritíðarpensjónistar antin missa rættin til dagpening, ella at tíðarskeiðið verður lækkað niður í eina helvt. Flestu fyritíðarpensjónistar høvdu tó havt fulla pensjón eftir – men tað, at dagpengarnir minka ella falla burtur merkir so eina inntøkulækking. Tað kann tó ikki útihýsast, at onkur einstakur ftp fer at uppliva at hava eina lækkaða pensjón eftir, men so er talan um ftp, sum hava havt eina rættiliga høga inntøku frá arbeiðsmarknaðinum (og havast skal í huga, at er inntøkan ov høg, so tekur Almannastovan pensjónsmálið upp til endurskoðan).
Herda kravið hevði ikki havt við sær avleiðingar fyri tey flestu, sum eru fevnd av skipanini. Talan er í høvuðsheitum um at veitingin í størri mun avspeglar inntøkuna frammanundan fráveruna.
Verandi krav um tilknýti til arbeiðsmarknaðin er somikið lágt, at misnýtsla ikki kann útihýsast.

***Gjøgnumførsla***
Verður gjørt við lógarbroyting og kann fáa virknað beinanvegin.

| Nr. | Navn á tiltaki (tkr.) | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Dagpeningaskipanin - hera kravið um rætt til dagpening | 2.300 | 2.300 | 2.300 | 2.300 | 2.300 |

## 2. Tillagan av pensjónsskipanini.

Ætlanin er at hækka pensjónsaldurin, og at gera broytingar sambært pensjónsreforminum, sum sparir landskassanum útreiðslur tey næstu 5 árini.

Samgongan ætlar við hesum tiltøkum at spara tilsamans 90 mió. kr. í pensjónsútreiðslum fram til 2017.

| Nr. | Navn á tiltaki (tkr.) | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 2 | Tillagan av pensjónsskipanini | 33.000 | 37.000 | 41.000 | 85.000 | 90.000 |

## 3. Fyritíðarpensjón verður veitt frá tí mánaði, at fyritíðarpensjónin verður tillutað

***Endamál***

At minka um útreiðslurnar til fyritíðarpensjón við fyrst at veita pensjónina frá tí mánaði, at hon verður tillutað. Hetta kann eisini viðføra eina umsitingarliga sparing.

Sambært galdandi skipan er tað soleiðis, at ein umsókn um fyritíðarpensjón vanliga tekur nakað av tíð at viðgera. Talan kann vera upp í heilt nógvar mánaðir. Í viðgerðartíðini er ikki óvanligt at umsøkjarin móttekur aðra almannaveiting – serliga kann talan vera um dagpening ella forsorgarveiting. Fyritíðarpensjónin verður so játtað frá tí degi, at umsóknin er latin inn, og sostatt er vanliga talan um eitt rættiliga stórt eftirgjald.

Forsorgarveitingin verður so mótroknað krónu fyri krónu í eftirgjaldinum. Sjúkradagpeningurin ella løn er at rokna sum a-inntøka, sum verður mótroknað við 30 % av inntøkuni omanfyri 90.600 kr. T.v.s. at hesi seinnu varðveita fullar dagpengar ella løn, og ein týðandi part av pensjónini.
Eina skipan av hesum slag er galdandi í norskari lóggávu viðvíkjandi "uførepensjón".

***Fíggjarlig effekt stutt/longri sikt***

Sparingin fyri landskassan verður umleið 10 mió. kr. árliga. Væntandi verður sparingin nakað størri, men fyri at siga tað meira neyvt, skal hetta kannast nærri.

***Avleiðingar***

Hetta fer at merkja at ein fyritíðarpensjónistur ikki fer at fáa dupultveiting fyri sama tíðarskeið, men einans til dømis dagpening og tá skeiðið er runnið fer pensjónisturin at fáa pensjón.

***Gjøgnumførsla***

Henda broyting má kannast nærri. Mett verður tó, at ein lógarbroyting kann gerast beinanvegin og fáa virknað frá 2013.

| Nr. | Navn á tiltaki (tkr.) | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 3 | Fyrtíðarpensjón: "Gensidigt udelukkende ydelser", sum dagpening e.a. | 10.000 | 10.000 | 10.000 | 10.000 | 10.000 |

## 4. Eldrarøkt, niðurleggja 8 pláss á røktardeildini á Klaksvíkar ellis- og røktarheimi, tá nýggja ellis og røktarheimið letur upp

***Endamál***

Niðurleggja dupultkømur á Klaksvíkar ellis- og røktarheimi. Á Klaksvíkar ellis- og røktarheimi eru 14 kømur á hvørjari deild til 18 búfólk, t.v.s. at 4 kømur á hvørjari deild eru dupultkømur. Endamálið er at skapa eina eins tænastu fyri øll búpláss innan eldrarøktina í Føroyum.

***Fíggjarlig effekt stutt/longri sikt***

Sparing verður umleið 3,6 mió.kr.

*Avleiðingar*
Avleiðingarnar eru at tað verða ikki 24 nýggj pláss til Norðoyggjar, tá nýggja røktarheimið letur upp, men einans 16 pláss.

Tað hevur leingi verið ætlanin at niðurleggja plássini, eins og á Suðuroyar ellis- og røkarheimi, soleiðis at tænastan innan eldrarøktina kring landið verður meiri eins. Ein avleiðing er eisini at starvsfólkanormeringin til heimið lækkar.

*Gjøgnumførsla*
Farið kann verða undir hetta beinanvegin við nátúrligari frágongd. T.e. tá búfólk andast, verða ikki nýggj fólk tikin inn, men plássini kunnu í staðin brúkast til umlætting.

| Nr. | Navn á tiltaki (tkr.) | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 4 | Eldrarøkt, niðurleggja 8 pláss á røktardeildini á Klaksvíkar ellis- og røktarheimi, tá nýggja ellis og røktarheimið letur upp | 1.600 | 3.600 | 3.600 | 3.600 | 3.600 |

## 5. Eldrarøkt, nýggj tøkni

*Endamál*
Effektivisering í rakstrinum, t.e. skráseting av heimahjálp á staðnum og harvið minni spilltíð og aðrar sparingar.

***Fíggjarlig effekt stutt/longri sikt***
Sparing verður ásett at vera umleið 2,0 mió.kr. árliga.

*Avleiðingar*
Neyðugt verður at kanna hetta betur.

*Gjøgnumførsla*
Kann verða farið undir at kanna hvat fyri sparingar kunna verða gjørdar.

| Nr. | Navn á tiltaki (tkr.) | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 5 | Eldrarøkt nýggj tøkni | 1.500 | 2.000 | 2.000 | 2.000 | 2.000 |

## 6. Eldrarøkt og Serforsorg sparing í leiðslu og niðurlegging av ótíðarhóskandi sambýlum.

*Endamál*
Effektivisering í leiðslu og niðurlegging av ótíðarhóskandi sambýlum

***Fíggjarlig effekt stutt/longri sikt***
Mett verður at møguligt er at spara umleið 2 mió.kr. í effektivisering í leiðslu innan eldrarøktina. Talan er um 1 mió.kr. í 2013 og 1 mió.kr. afturat í 2014.

Við at niðurleggja ótíðarhóskandi sambýli innanfyri Serforsorgina og eldrarøktina og samtíðis upprætta dagtilhald, kunnu umleið 8,2 mió. kr. sparast yvir trý ár.

***Avleiðingar***

Avleiðingarnar av at spara í leiðslu, er at enn fleiri starvsfólk verða um hvønn leiðara, men mett verður at henda ikki fer at fáa álvarsligar avleiðingar fyri leiðslubygnaðin í Eldrarøktini.

Niðurlegging av ótíðarhóskandi sambýlum, hevur við sær at tilboð verða til færri brúkarar. Hinvegin verður tilboðið betri, orsakað av at hølisumstøður verða nútímansgjørdar og tískil betri bæði fyri búfólk og starvsfólk. Samstundis verða tað innan eldrarøktina upprættað dagtilhald, sum hevur við sær at brúkarar kunnu vera longur í egna heimi.

***Gjøgnumførsla***

Kann verða farið undir fyrireiking í hesum árinum.

| Nr. | Navn á tiltaki (tkr.) | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 6 | Umskipað ótíðarhóskandi sambýli til dagtilhald, ella onnur tilboð, og umskipan innanfyri leiðsluna/virksemið í eldrarøktini | 3.900 | 8.000 | 10.200 | 10.200 | 10.200 |

## § 15 Innlendismál

Rakstrartiltøk árini 2013 til 2017 fyri innlendismál.

| Nr. | Navn á tiltaki (tkr.) | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Tillagingar í rakstri og stuðli | 400 | 2.100 | 3.254 | 4.290 | 4.290 |

**Talgilda kunngerðarblaðið**
Arbeitt verður við at talgilda kunngerðarblaðið, sum verður tann løggildi kunngerðarhátturin tá talgildingin er framd í verki, og verður roknað við at arbeiðið verður liðugt í ár. Tað merkir, alt annað óbroytt, eina sparing uppá umleið 200 tús kr. árliga.

**Umhvørvisstovan og útlendingastovan løgd saman**
Útlendingastovan verður løgd undir Umhvørvisstovuna, hin 1. juli 2012. Endamálið er at tryggja brúkaranum eina betri tænastu, umframt at raksturin av Útlendingarstovuni kann kann gerast bíligari. Tað merkir eina sparing uppá 300 tús kr.

Hetta skal tó síggjast í tí høpi, at játtanin til Umhvørvisstovuna longu er lækkað við **14% farnu tvey árini**, og at sparingin tí er avmarkað.

**Aðrar sparingar**
Fleiri aðrar sparingar verða gjørdar fyri at halda útreiðslukarmin, og eru tær hesar:

**Innlendismálaráðið**
Játtanin til Innlendismálaráðið verður eftir ætlan lækkað frá 10,8 mió kr. í 2012, til 10,3 mió kr. í 2014. Tað vil siga við 500 tús kr. Tað verður framt við sparingum.

**Landsverk**
Játtanin til Landsverk verður lækkað við 230 tús. kr í 2016.

**Spilloljureinsing**
Játtanin er stuðul til IRF, til at savna inn og reinsa spillolju, soleiðis at hon ikki dálkar náttúruna, og til at byggja nýtt spilloljuverk. Innlendismálaráðið hevur givið tilsøgn í málinum í 2009 um at fara undir at byggja.

Eftir ætlan lækkar játtanin frá 4,0 mió. kr. í 2013, til 3,4 mió kr. í 2017, ella við 600 tús. kr.

**Studningar**
Innlendismálaráðið umsitur ymiskar studningar. Eitt nú stuðul til umhvørvisverndartiltøk, stuðul til útoyggjamenning, stuðul til infrakervið á útoyggj, og stuðul til ráðið fyri ferðslutrygd.

Eftir ætlan lækka játtanirnar samanlagt til hesi endamál frá 4,0 mió. kr. í 2013, til 3,3 mió. kr. í 2014, til 2,3 mió. kr. í 2015, og síðan til 1,7 mió. kr. í 2016.

## § 20 Inntøkutiltøk

| Nr. | Navn á tiltaki (tkr.) | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Rentuinntøkur, umskipan av stovnum og virksemi undir Fíggjarmálaráðnum | 4.000 | 4.000 | 4.000 | 4.000 | 4.000 |
| 2 | Skattur og vinningsbýti frá grunnum | 15.000 | 15.000 | 15.000 | 15.000 | 15.000 |
| 3 | Broyting av arvaavgjaldinum | 2.000 | 2.000 | 2.000 | 2.000 | 2.000 |
| 4 | Gjald frá fiski- og alivinnu | 120.000 | 120.000 | 120.000 | 120.000 | 120.000 |
| | **Tilsamans** | **141.000** | **141.000** | **141.000** | **141.000** | **141.000** |

### 1. Rentuinntøkur, umskipan av stovnum og virksemi undir Fíggjarmálaráðnum

*Endamál*

Sum úrslit av umskipan av stovnum undir Fíggjarmálaráðnum fer umsitingin av gjaldføri Landskassans at vera umsitin av Føroya Gjaldstovu. Samanlagt hækka nettoinntøkur landskassans 4 mió. kr. um árið.

***Fíggarlig effekt stutt/langt sikt***

Landsbankin hevur vanliga rindað 80 prosent av yvirskoti sínum til landskassan og lagt 20 prosent í tiltaksgrunn. Vanliga verður sostatt um 4 mió. kr. lagdar í tiltaksgrunn um árið. Av tí at bruttorenturnar av gjaldføri landskassans framyvir fara beinleiðis í landskassan fer upphæddin, sum higartil er farin til tiltaksgrunnin, frameftir beinleiðis í landskassan, og gevur hetta hægri rentuinntøkur á mettar 4 mió. kr. um árið.

***Avleiðingar***

Sí brotið undir rakstrartiltøkunum um umskipan av stovnum og virksemi undir Fíggjarmálaráðnum.

***Gjøgnumførsla***

Sí brotið undir rakstrartiltøkunum um umskipan av stovnum og virksemi undir Fíggjarmálaráðnum.

| Nr. | Navn á tiltaki (tkr.) | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Rentuinntøkur, umskipan av stovnum og virksemi undir Fíggjarmálaráðnum | 4.000 | 4.000 | 4.000 | 4.000 | 4.000 |

### 2. Skattur og vinningsbýti frá grunnum

Landið eigur í dag grunnar, ið reka vinnuligt ella vinnulíknandi virksemi, og eru hesir ikki skattskyldigir og hava ikki krav um vinningsbýti frá eigaranum. Mett verður, at tað er rætt at hesir frameftir koma at rinda felagsskatt og vinningsbýti. Harumframt skal fastari leistur gerast fyri, hvussu almenn partafeløg rinda vinningsbýti.

Í álitunum um Landsstovnar og -grunnar (Grunnaálitið) frá 2001 var tilknýti hjá eini røð av grunnum til landið viðgjørt. Síðani tá er Vinnusjúkugrunnurin komin afturat. Tilknýtið til landið hjá teimum stóru av grunnunum, og skyldan hjá hesum at rinda felagsskatt sæst í talvuni niðanfyri:

| **Heiti** | **Landsgrunnur** | **Skattskyldugur av yvirskoti** |
|---|---:|---:|
| Arbeiðsloysistryggingin | Ja | Nei |
| Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin | Ja | Nei |
| Búagrunnurin | Nei | Nei |
| Búnaðargrunnurin | Ja | Nei |
| Fíggingargrunnurin frá 1992 | Nei | Ja |
| Føroya Realkreditstovnur | Ja | Ja |
| Føroyagrunnurin frá 1971 | Nei | Ja |
| Framtaksgrunnurin | Nei | Ja |
| Frítíðargrunnurin | Ja | Nei |
| Granskingargrunnurin | Ja | Nei |
| Húsalánsgrunnurin | Ja | Nei |
| Íleggingargrunnurin | Nei | Ja |
| Landsbanki Føroya | Ja | Nei |
| Mentannargrunnur Landsins | Ja | Nei |
| Trygdargrunnurin | Ja | Nei |
| Vinnuframagrunnurin | Ja | Nei |
| Vinnusjúkugrunnurin | Ja | Nei |

Sum sæst er sera ymiskt, hvørt grunnarnir eru landsgrunnar og hvørt teir eru skattskyldigir.

Fíggingargrunnurin frá 1992, Føroyagrunnurin frá 1971 og Framtaksgrunnurin eru skattskyldigir sambært § 1 stk. 1 nr. 9 í skattalógini, meðan Føroya Realkreditstovnur og Íleggingargrunnurin fyri Føroyar eru skattskyldigir eftir § 1 stk. 1 nr. 17 í somu lóg.

Flestu av hesum grunnum eru antin skattskyldigir frammanundan ella røkja endamál, ið eru av sosialum ella samfelagsligum slag, og tað tí ikki er ætlan um at skatta ella fáa vinningsbýti frá. Nakrir eru tó, ið mett verður eiga koma undir skattskyldu og krav um vinningsbýti.

**Skattskyldu til grunnar:**
Ætlanin hjá landsstýrinum er, at gera Búagrunnin, Búnaðargrunnin og Húsalánsgrunnin skattskyldugar eftir skattalógini. Grundgevingin er, at hesir útinna virksemi, ið er av slíkum slag, at hesi eiga ikki at sleppa undan skattskyldu.

Eginpeningurin hjá hesum trimum grunnum er ávikavist 8, 312 og 603 mió. kr. við ársenda 2010. Av tí at endamálið hjá hesum grunnunum ikki primert er avkast, hevur avkastið verið lágt. Um avkastið verður mett at vera í miðal 2,5 prosent um árið verður mett, at nýggja skattskyldan gevur landinum størri skattainntøku á 3 mió. kr. árliga.

**Vinningsbýti frá almennum feløgum og grunnum**
Ætlanin er, at landið skal hava ein triðing av úrslitinum eftir skatt í vinningsbýti, bæði frá almennum partafeløgum og frá grunnum, ið reka ávíst vinnuligt, vinnulíknandi ella vinnuknýtt virksemi.

Fyri partafeløg er ætlanin, at umboð landsstýrsins á aðalfundi í útgangspunktinum skulu atkvøða fyri uppskotum um vinningsbýti á ein triðing av úrslitinum eftir skatt. Um neyðugt, verður støða til frávik frá hesum frá ferð til ferð tikin av avvarandi landsstýrismanni.

Fyri ávísar landsgrunnar verður lógarbroyting gjørd, har grunnarnir verða álagdir at rinda landskassanum ein triðing av úrslitinum eftir skatt í vinningsbýti. Her verður talan um Húsalánsgrunnin, Búnaðargrunnin og Føroya Realkreditstovn.

Eginpeningurin og meting um forrentning hjá Húsalánsgrunninum og Búnaðargrunninum síggjast í brotinum omanfyri. Føroya Realkreditstovnur hevur eginpening á 736 mió. kr. og kann væntast at forrenta eginpeningin við minst 5 prosentum. Mett verður varisliga, at kravið um vinningsbýti, tá hædd er tikin fyri, at nevndu grunnar koma at rinda skatt av skattliga úrslitinum, fer at geva landinum inntøku á um 12 mió. kr. árliga.

| Nr. | Navn á tiltaki (tkr.) | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 2 | Skattur og vinningsbýti frá grunnum | 15.000 | 15.000 | 15.000 | 15.000 | 15.000 |

## 3. Broyting av arvaavgjaldinum

***Endamál***

At tryggja at avgjøld sum sambært heimastýrislógini skulu í landskassan eisini koma í landskassan. Arvaavgjald verður kravt við heimild í anordning nr. 468 frá 8. november 1921 við seinni broytingum. Eftir hesum anordningi verður avgjaldi býtt millum landskassan og ríkiskassan. Seinastu árini eru áleið 20 % av avgjaldinum farin í ríkiskassan.

Í heimastýrislógini undir føroysk sermál listi a nr. 6 verður ásett: *Beinleiðis og óbeinleiðis skattur, harundir hoyra eisini stempulgjøld, gjald av totalisatorspæli, gjald av serligum føroyskum happadrátti, meðan gjald fyri avgreiðslu, so sum skiftigjøld, rættarsportlar, tinglesingargjøld fara til tann, ið ber útreiðslurnar av avvarðandi stovni.*

Arvagjaldið er ikki eitt gjald fyri sjálvt arbeiðið sum stendst av skiftinum og fellur tí uttanfyri seinna liðið í greinini og er ein vanligur skattur. Gjaldið fyri skifti er ásett í kap. 5 í rættargjaldslógini og har er ongin broyting ætlað.

***Fíggjarlig effekt stutt/longri sikt***

Grundað á hagtøl fyri arvaavgjald seinastu 6 árini verður mett, at áleið 2 mió. kr. í dag fara í statskassan sum í veruleikanum eiga at fara í landskassan. Lógarbroytingin kemur sostatt at merkja eina árliga meirinntøku fyri landskassan upp áleið 2 mió. kr.

***Avleiðingar***

Uppskotið hevur ongar fyrisitingarligar avleiðingar.

***Gjøgnumførsla***
Lógaruppskot, ið skal hava virknað frá 1. januar 2013, verður í summar lagt fyri Løgtingið

| Nr. | Navn á tiltaki (tkr.) | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 3 | Broyting av arvaavgjaldinum | 2.000 | 2.000 | 2.000 | 2.000 | 2.000 |

## 4. Gjald frá fiski- og alivinnu

***Endamál.***
Skapast skulu tryggir karmar fyri alla tilfeingisvinnu. Meðan alivinnan hevur fingið rættiliga tryggar karmar at arbeiða undir, er óvissan um framtíðar arbeiðstreytirnar hjá fiskivinnuni alt ov stór.

Landsstýrið ásannar, at tryggir vinnuligir karmar er ein avgerandi fyritreyt fyri búskaparligum vøkstri. Tí arbeiðir landsstýrið við at evna uppskot til, ið gevur vinnuni brúksrættindi til tilfeingið, grundað á áseting um uppsagnartíð. Á hendan hátt verður spurningurin um gildistíð hjá fiskivinnuni í sambandi við 2018 avgreiddur og lagdur í fasta legu.

Landsstýrið hevur somuleiðis í umbúna at kanna ymsar ásetingar, ið kunna tryggja fleiri arbeiðspláss í Føroyum. Fiskivinnulóggávan verður dagførd og gjørd einfaldari, og á tann hátt kann umsitingin á mongum økjum gerast einfaldari og gjøgnumskygni betri. Dagføringin av lóggávuni hevur somuleiðis til endamáls at staðfesta, um bygnaðurin í skipanini er best hóskandi, viðvíkjandi búskaparligari tillaging av rættindum og flota.

Øll viðgerðin tekur støðið úr tí fyritreyt, at vinnan skal hava fríar møguleikar at leggja sína veiði til rættis og laga sítt virksemi til tøkur veiðimøguleikar.

***Fíggjarlig effekt stutt/longri sikt***
Eydnast at fáa optimalar karmar fyri tilfeingisvinnuna, ber til at fáa størri part av tilfeingisrentuni til høldar og búskaparvøksturin komandi árini verður størri. Landsstýrið er komið ásamt um, at landskassans partur av tilfeingisrentuni í fiskivinnuni og alivinnuni árini 2013 – 2017 skal verða 120 mió. kr. árliga.

***Avleiðingar***
Avleiðinganar verða bæði fyri landskassa og vinnu. Hóast vinnan má gjalda nakað fær hon tryggari karmar at arbeiða undir. Hetta hevur ikki minst týdning, tá íløgur skulu gerast. Landskassin fær eitt breiðari inntøkugrundarlag.

***Íverkseting***
Landsstýrið arbeiðir við at evna til eitt uppskot um tilfeingisgjald bæði fyri fiskivinnuna og alivinnuna, ið skal geva landskassanum eina árliga inntøku uppá 120 mió. kr. Endalig støða er ikki enn tikin til, hvussu hetta gjald skal setast saman, men miðað verður ímóti einum gjaldi, ið minst møguliga virkar vinnuliga avlagandi.

| Nr. | Navn á tiltaki (tkr.) | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 4 | Gjald frá fiski- og alivinnu | 120.000 | 120.000 | 120.000 | 120.000 | 120.000 |

# APPENDIKS 3: LØGUR 2013-2024

Talvan niðanfyri vísir løguætlan landsstýrisins frá 2013 til 2024, umframt samtyktar løgujáttanir fyri 2012. Løgur fyri 265,7 mió. kr. skulu eftir ætlan fremjast í 2012. Frá og við 2013 verður løgukarmurin hækkaður til á leið 300 mió. kr., um árið.

Niðanfyri eru løgurnar árini 2013-2024 á einstaku greinunum viðgjørt.

**§ 1 Løgtingið**
Eingin løgutiltøk eru fyri greinina.

**§ 2 Løgmansfyrisitingin**
3,0 mió. kr. verða avsettar til umbygging í Tinganesi. Umbyggingin tekur støði í ”Heildarætlan fyri Tinganes”, ið gjørd varð fyri nøkrum árum síðani.

**§ 3 Fíggjarmál**
Eingin tiltøk eru ásett fyri greinina í 2013. Í 2019-2021 er ætlanin at gera stórumvæling av bygninginum hjá Fíggjarmálaráðnum á Argjum.

**§ 5 Fiskivinnumál**
Eingin tiltøk eru ásett fyri greinina í 2013. Árini 2017-2018 verður smíðað nýtt havrannsóknarskip.

**§ 6 Vinnumál**
Í 2013 verða 24,5 mió. kr. játtaðar til løgur innan Strandfaraskip Landsins. Av upphæddini hjá Strandferðsluni til dokking verða 13,5 mió. kr. settar av til dokking av Smyrli í 2013, 12 mió. kr. í 2015 og og 10 mió. kr. í 2017. Viðmerkjast skal, at krøvini til dokking verða herd, tá Smyril er vorðin 10 ár í 2015, og skal skipið tá í dokk annað hvørt ár, heldur enn triðja hvørt ár sum higartil. Útyvir Smyril fer játtaða upphæddin til dokking og størri viðlíkahald av smærru skipunum hjá Strandferðsluni.

Settar verða av 7,5 mió. kr. í 2013, 20 mió. kr. í 2014 og 22,5 mió. kr. í 2015 til bygging av nýggjum skipi. Í upphæddini er íroknað prosjektering.

**§ 7 Mentamálaráðið**
*Studentaskúlin og HF-skeiðið í Eysturoynni:* Á fíggjarlógini 2012 vórðu játtaðar 2,5 mió.kr. til at fyrireika eina um- og útbygging av miðnámsskúlunum á Kambsdali í 2013 og 2014 fyri í mesta lagi 22,5 mió.kr. íroknað fyrireiking. Bygginevnd verður sett at gera byggiskrá og lýsa hølistørvin. Endamálið við útbyggingini er at nøkta hølistørvin og tryggja næmingum og lærarum nútímans námsfrøðiligar karmar. Ætlanin er at leggja verklagslóg fyri Løgtingið á Ólavsøku.

*Tekniski Skúli í Klaksvík:* Á fíggjarlógini 2012 vórðu 3 mió.kr. játtaðar til at fyrireika eina útbygging av Tekniska Skúla í Klaksvík fyri í mesta lagi 35 mió.kr. íroknað fyrireiking. Útbyggingin skal fevna um høli til matvøruvøruútbúgvingina á skúlanum umframt vanlig flokshøli. Ætlanin er eisini at byggja skúlan út, soleiðis at HF-deildin í Klaksvík í framtíðini kann húsast á Tekniska skúla í Klaksvík. Bygginevnd verður sett at gera byggiskrá, ið lýsir hølistørvin, og er endamálið at tryggja næmingum og lærarum nútímans námsfrøðiligar karmar. Verklagslóg er løgd fyri Løgtingið.

*Skúladepil við Marknagil:* Eftir ætlan verður farið undir at byggja skúladepilin í 2012. Sambært Ll. nr. 43 frá 26. mai 2008 skal skúladepilin hýsa virkseminum hjá Føroya Studentaskúla og HF-skeiði, Tekniska Skúla og Føroya Handilsskúla í Tórshavn. Samlaðu byggiútreiðslurnar eru í verklagslógini ásettar at vera í mesta lagi 391 mió. kr., harafturat verður roknað við 60 mió. kr. til útgerð og innbúgv. Ætlandi verður skúladepilin liðugt bygdur í 2015, soleiðis at skúlin við innbúgvi kann standa liðugur á vári 2016.

*Tjóðleikhús:* Hølisumstøðurnar hjá Tjóðpalli Føroya eru út av lagi vánaligar. Á løgtingsfíggjarlógini 2011 vórðu játtaðar 5 mió. kr., sum eru støðlaðar til at fyrireika bygging av tjóðleikhúsi. Haraftrat eru settar av 45 mió.kr. á langtíðarløguætlanini frá 2016 og fram. Bygginevnd verður sett at gera byggiskrá, ið skal lýsa hølistørvin, og sum kann verða grundarlag fyri projektering av byggiverkætlanini.

*Víðkað tilboð til ung við serligum tørvi:* Mentamálaráðið tók stig til at seta Rásina í Runavík á stovn í 2003 sum eitt skúlatilboð til ung við serligum tørvi. Endamálið við skúlatilboðnum er at menna tey ungu til eitt sjálvstøðugt lív eftir lokið skúlaskeið. Hvørt skúlaskeiðið er í mesta lagi 3 ár. Ætlanin er at víðka hetta skúlatilboðið við einum skúla aftrat, fyri at nøkta vaksandi tørvin.

*Húsarhaldsskúli:* Ætlanin er at byggja ein nýggjan húsarhaldsskúla. Húsarhaldsskúlin virkar partvíst sum ein eftirskúli. Ætlanin við hesi íløgu er at bøta um verandi hølis- og íbúðarviðurskifti og tryggja næmingum og lærarum nútímans námsfrøðiligar karmar.

*Hvalastøðin við Áir:* Játtanin er til framhaldandi varðveitingararbeiði í sambandi við Hvalastøðina við Áir.

*Kirkjubømúrurin:* Játtanin er til framhaldandi varðveitingararbeiði í sambandi við Kirkjubømúrin.

*Søvn Landsins:* Játtanin er ætlað til at byggja hóskandi hølir til virksemið hjá Søvnum Landsins. Ætlanin er at umvæla gamla Sanatoriið í Hoydølum til skrivstovu- og verkstaðshøli og at byggja ein framsýningarbygning í Hoydølum. Harumframt er ætlanin at fara undir at byggja eina felags goymslu fyri søvnini, serliga til Landsskjalasavnið.

**Ítróttarhøll á Sandoynni:** Verkætlanin verður liðug í 2012 og er játtan ikki tøk eftirfylgjandi.

**§ 11 Heilsumálaráðið**

Í 2013 verða 5,8 mió. kr. settar av til at gera verkætlanina hjá Apoteksverkinum á Staravegi 15 lidna.

Fyri at halda tólaútbúnaðin hjá heilsuverkinum á einum jøvnum stigi er umráðandi, at hann regluliga verður endurnýggjaður. Játtaðar verða 8 mió. kr. í 2013 og eftirfylgjandi 9 mió. kr. um árið til keyp av medikotekniskum tólum.

Løgujáttanin til Landssjúkrahúsið verður nýtt samsvarandi verklagslógini (løgtingslóg nr. 77 frá 7. juni 2011 um broyting í løgtingslóg um at høvuðsumvæla, útbyggja og nútíðargera Landssjúkrahúsið).

Upphæddirnar 2012-2015 til Klaksvíkar sjúkrahús svara til verklagslógina (løgtingslóg nr. 23 frá 16. mars 2012 um at umbyggja og umvæla Klaksvíkar Sjúkrahús).

Upphæddin til Suðuroyar Sjúkrahús í 2013 fer til at liðuggera nýtímansgeranina av starvsfólkabygninginum hjá sjúkrahúsinum.

**§ 12 Almannamálaráðið**

Í 2013 verða 46,7 mió. kr. játtaðar til Bústovnar. Hildið verður fram við at byggja vardar bústaðir í Norðoyggjum og Eysturoy og við bygging av stovni í Eysturoynni til børn við fjølbreki, soleiðis at bygningarnir standa lidnir í 2013. Farið verður undir fyrireiking at byggja stovn fyri heilaskadd og ungdómspensjónat. Avsettar eru 4 mió. kr. til at yvirtaka "Sjálvsognarstovnin sambýlir ".

Í 2014 verða 15,8 mió. kr. brúktar til Bústovnar. Byrjað verður uppá stovn fyri heilaskadd og ungdómspensjónat. Farið verður undir fyrireiking at byggja stovn fyri autistar og menningartarnað.

Í 2015 verða 19,25 mió. kr. játtaðar til Bústovnar. Stovnur fyri heilaskadd verður liðugt bygdur og samstundis verður verandi stovnur, sum brúktur er til endamálið, seldur. Ungdómspensjónatið verður liðugt bygt. Byrjað verður uppá at byggja stovn fyri autistar og menningartarnað. Byrjað verður uppá sambýlið til menningartarnaði.

Í 2016 verða 18,45 mió. kr. játtaðar til Bústovnar. Stovnur fyri autistar og menningartarnað verður liðugt bygdur, meðan bygging av sambýlið til menningartarnaði heldur fram.

Í 2017 verða 8,5 mió. kr. játtaðar til Bústovnar. Upphæddin fer til at gera sambýlið til menningartarnaði liðugt.

Í 2018-2024 verða 43,6 mió. kr. settar av til Bústovnar. Ætlanin er at byggja eitt sambýli til menningartarnað og eitt sambýli til fólk við sálarsjúku, og skulu hesir koma ístaðin fyri nakrar av verandi bústaðum, ið í nøkrum førum ikki eru í nøktandi standi.

**§ 15 Innlendismál**

Til umvæling av almennum bygningum verða játtaðar 26,5 mió. kr. í 2013 og 2014, og eftirfylgjandi 30 mió. kr.

Til Skógrøkt landsins (Umhvørvisstovan) verða 2,0 mió. kr. játtaðar í 2013.

Til dagføring av brúm og tunlum verða játtaðar 4,0 mió. kr. í 2013. Neyðugt er at játta ávísa hvørt ár til dagføring av brúm og tunlum.

Vegurin omanfyri Skálafjørð verður raðfestur árini 2018-2021 fyri 50 mió. kr.

Til innkoyringarvegin til Havnar, íbinding, verða 10,0 mió. kr. játtaðar í 2013. Í árunum 2019-2020 verður upphædd avsett til innkoyringarvegin.

Til trygdartiltøk verða 6,0 mió. kr. játtaðar árlig.

Farleið til Dals verður byrjað í 2016 og endar í 2022. Brúkt upphædd verður 45,5 mió. kr.

Tunnil millum Gøtudal/Kambsdal og Skálafjørð verður gjørdur árini 2021-2024 fyri 122 mió. kr.

Til vegagerð í Kalsoy, vegir og tunlar, verða 2,0 mió. kr. játtaðar í 2013, og millum 2 og 3 mió. kr. árliga fram til 2019.

Hvalbiartunnil verður raðfestur árini 2018-2021 fyri 165 mió. kr.

Til tunnil til Viðareiðis (Viðareiðisloysn), verða 3,0 mió. kr. játtaðar í 2013. Eftir langtíðarløgu-ætlanini verða 135 mió. kr. játtaðar til verkætlanina fram til 2017.

Til vegagerð í Oyrunum, Toftir, verða 3,0 mió. kr. játtaðar í 2013 og 1 mió. kr. í 2014.

Til strekkið undir Valaknúkum, undir Gøtueiði, verða til breiðking játtaðar 3,0 mió. kr. í 2013 og 7 mió. kr. í 2014.

Til smáábøtur á havnir verða 2,2 mió. kr. játtaðar árliga fram til 2016.

Til fyrireiking til útbjóðing av Eysturoyartunlinum verða 6,0 mió. kr. játtaðar í 2013.

Til Sandoyartunnil verða 5 mió. kr. settar av í 2015, 25 mió. kr. í 2016 og síðani 35 mió. kr.2017-2019, og 50 mió. kr. árini 2020-2024.

**Talva 8.1: Langtíðarløguætlan 2013-2017**

| *Mió. kr.* | **2012** | **2013** | **2014** | **2015** | **2016** | **2017** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| §2 | | | | | | |
| Umbygging í Tinganesi (Skansapakkhúsið) | 1.500 | 3.000 | 3.000 | 3.000 | 3.000 | 3.000 |
| **§2 tilsamans** | **1.500** | **3.000** | **3.000** | **3.000** | **3.000** | **3.000** |
| §3 | | | | | | |
| Flyting av fíggjar-og búskaparstovnum landsins | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **§3 tilsamans** | **0** | **0** | **0** | **0** | **0** | **0** |
| §5 | | | | | | |
| Havrannsóknarskip | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 85.000 |
| **§5 tilsamans** | **0** | **0** | **0** | **0** | **0** | **85.000** |
| §6 | | | | | | |
| Strandfaraskip Landsins - dokking v.m. | 17.500 | 16.950 | 1.400 | 12.000 | 1.000 | 10.000 |
| Strandfaraskip Landsins - nýtt skip | 0 | 7.500 | 20.000 | 22.500 | 0 | 0 |
| **§6 tilsamans** | **17.500** | **24.450** | **21.400** | **34.500** | **1.000** | **10.000** |
| §7 | | | | | | |
| Studentaskúlin og HF-skeiðið í Eysturoy | 2.500 | 10.000 | 10.000 | 0 | 0 | 0 |
| Tekniski skúli í Klaksvík | 3.000 | 10.000 | 10.000 | 12.000 | 0 | 0 |
| Skúladepil við Marknagil | 55.000 | 85.000 | 85.000 | 95.000 | 65.000 | 0 |
| Fróðskaparsetrur Føroya | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Tjóðleikhús | 0 | 0 | 0 | 0 | 3.000 | 13.500 |
| Víðkað tilboð til ung við serligum tørvi | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Húsarhaldsskúli | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Hvalastøðin við Áir | 2.500 | 1.000 | 1.000 | 1.000 | 1.000 | 0 |
| Kirkjubømúrurin | 1.000 | 1.000 | 1.000 | 1.000 | 0 | 0 |
| Søvn Landsins | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Ítróttarhøll á Sandoynni | 14.000 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **§7 tilsamans** | **78.000** | **107.000** | **107.000** | **109.000** | **69.000** | **13.500** |
| §11 | | | | | | |
| Apoteksverkið, Staravegur | 20.200 | 5.800 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Medicoteknisk tól | 7.200 | 8.000 | 9.000 | 9.000 | 9.000 | 9.000 |
| Landssjúkrahúsið | 15.000 | 30.000 | 40.000 | 30.000 | 86.000 | 60.000 |
| Klaksvíkar sjúkrahús | 5.000 | 5.000 | 5.000 | 1.000 | 0 | 0 |
| Suðuroyar Sjúkrahús | 1.100 | 1.000 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **§11 tilsamans** | **48.500** | **49.800** | **54.000** | **40.000** | **95.000** | **69.000** |

Heldur fram á næstu síðu.

| 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 | 2024 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 3.000 | 3.000 | 3.000 | 3.000 | 3.000 | 3.000 | 3.000 |
| **3.000** | **3.000** | **3.000** | **3.000** | **3.000** | **3.000** | **3.000** |
| | | | | | | |
| 0 | 500 | 10.500 | 10.500 | 0 | 0 | 0 |
| **0** | **500** | **10.500** | **10.500** | **0** | **0** | **0** |
| | | | | | | |
| 90.000 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **90.000** | **0** | **0** | **0** | **0** | **0** | **0** |
| | | | | | | |
| 0 | 14.800 | 1.500 | 14.000 | 0 | 13.000 | 800 |
| 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **0** | **14.800** | **1.500** | **14.000** | **0** | **13.000** | **800** |
| | | | | | | |
| 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 0 | 0 | 5.000 | 13.000 | 13.000 | 17.000 | 7.150 |
| 28.500 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 0 | 5.000 | 10.000 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 2.500 | 14.000 |
| 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 0 | 0 | 6.400 | 12.250 | 13.000 | 17.400 | 0 |
| 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **28.500** | **5.000** | **21.400** | **25.250** | **26.000** | **36.900** | **21.150** |
| | | | | | | |
| 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 9.000 | 9.000 | 9.000 | 9.000 | 9.000 | 9.000 | 9.000 |
| 36.000 | 51.000 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **45.000** | **60.000** | **9.000** | **9.000** | **9.000** | **9.000** | **9.000** |

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **§12** | | | | | | |
| Bústovnar | 21.650 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Stovnur fyri Heilaskadd | 0 | 500 | 7.000 | 7.000 | 0 | 0 |
| Selja verandi hús | 0 | 0 | 0 | -3.000 | 0 | 0 |
| Vardir bústaðir í Eysturoynni í Norðoyggjum | 0 | 30.900 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Depil í Eysturoynni til fjølbrekaði | 0 | 10.800 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Ungdómspensjónat | 0 | 500 | 8.300 | 8.300 | 0 | 0 |
| Sjálvsognarstovnurin Sambýlir (avtøka) | 0 | 4.000 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Sambýli til menningartarnað í Tórshavn | 0 | 0 | 0 | 1.000 | 12.500 | 8.500 |
| Sambýli fólk við sálarsjúku | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Sambýli til autistar og menningartarnað | 0 | 0 | 500 | 5.950 | 5.950 | 0 |
| Sambýli til menningartarnaði | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Dugni-Skúlin við Áir | 1.850 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **§12 tilsamans** | **23.500** | **46.700** | **15.800** | **19.250** | **18.450** | **8.500** |
| | | | | | | |
| **§15** | | | | | | |
| Umvæling av almennum bygningum | 26.500 | 26.500 | 26.500 | 30.000 | 30.000 | 30.000 |
| Umhvørvisstovan | 2.000 | 2.000 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Dagføring av brúm, tunlum og vegum | 3.000 | 4.000 | 4.000 | 4.000 | 4.000 | 4.000 |
| Vegurin oman fyri Skálafjørð | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Vegurin til Selatraðar, breiðking | 2.000 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Innkoyring, Havnin íbinding | 0 | 10.000 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Innkoyringarvegur, Klingran Skarðshjalli | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Innkoyringarvegur, Klingran Krákugjógv | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Trygdartiltøk | 5.700 | 6.000 | 6.000 | 6.000 | 6.000 | 6.000 |
| Farleiðs til Dals, tryggja verandi veg | 0 | 0 | 0 | 0 | 2.000 | 2.000 |
| Farleiðs til Fámijins, veg og stuttan tunnil | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Vegagerð í Leirvík | 31.000 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Tunlar norð um Fjall | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Tjørnuvíkuvegurin, tryggjan | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Tunnil Gøtudal/Kambsdalur - Skálafjørður | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Vegagerð í Kallsoy, vegir og tunlar | 2.000 | 2.000 | 3.000 | 2.000 | 3.000 | 3.000 |
| Hvalbiartunnilin | 3.000 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Inni í Firði í Kollafirði | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Millum Fjarða til Funningsfjørð | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 5.000 |
| Ferðsluætlan Vágar | 0 | 0 | 5.000 | 4.000 | 4.000 | 2.000 |
| Dagføring av Leirvíkar & Kollafjarðartunnilinum | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Søla av jørð til kommunur | -100 | -100 | -100 | -100 | -100 | -100 |
| Søldarfjørður, umkoyringarvegur | 1.000 | 0 | 1.000 | 3.500 | 5.000 | 5.000 |
| Tunnil til Viðareiðis | 5.000 | 3.000 | 37.000 | 35.500 | 40.500 | 19.000 |
| Í oyrunum - Toftir | 0 | 3.000 | 1.000 | 0 | 0 | 0 |
| Farleið til Vestmanna | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Undir Valaknúkum - Undir Gøtueiði, breiðkan | 0 | 3.000 | 7.000 | 0 | 0 | 0 |
| Íbinding í Hósvík | 4.000 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Æðuvíkavegurin breiðking | 300 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Íbinding Skála | 4.000 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Vegurin til Akrar | 3.000 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Norðoyri | 2.800 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Um Eiðisskarð | 500 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Havnir | 1.000 | 2.200 | 2.200 | 2.200 | 2.000 | 0 |
| Sandoyartunnilin | 0 | 0 | 0 | 5.000 | 25.000 | 35.000 |
| Skálafjarðartunnilin, fyrireiking til útbjóðing | 0 | 6.000 | 6.000 | 0 | -12.000 | 0 |
| **§15 tilsamans** | **96.700** | **67.600** | **98.600** | **92.100** | **109.400** | **110.900** |
| | | | | | | |
| **Løguútreiðslur §1-§15** | **265.700** | **298.550** | **299.800** | **297.850** | **295.850** | **299.900** |
| *Indeks* | *100* | *112* | *113* | *112* | *111* | *113* |

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 500 | 10.650 | 10.650 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 0 | 0 | 0 | 0 | 500 | 10.650 | 10.650 |
| 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **500** | **10.650** | **10.650** | **0** | **500** | **10.650** | **10.650** |
| | | | | | | |
| 30.000 | 30.000 | 30.000 | 30.000 | 30.000 | 30.000 | 30.000 |
| 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 4.000 | 5.000 | 5.000 | 5.000 | 10.000 | 10.000 | 10.000 |
| 10.000 | 10.000 | 25.000 | 5.000 | 0 | 0 | 0 |
| 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 0 | 20.000 | 42.000 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 16.000 | 16.000 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 6.000 | 6.000 | 6.000 | 10.000 | 10.000 | 10.000 | 0 |
| 7.500 | 8.000 | 10.000 | 10.000 | 6.000 | 0 | 0 |
| 0 | 0 | 0 | 0 | 1.000 | 40.000 | 29.000 |
| 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 0 | 0 | 0 | 55.000 | 115.000 | 55.000 | 40.000 |
| 2.000 | 3.000 | 3.000 | 3.000 | 4.500 | 4.000 | 5.500 |
| 0 | 0 | 0 | 1.000 | 10.000 | 25.000 | 86.000 |
| 2.000 | 2.000 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 10.000 | 61.500 | 52.500 | 41.000 | 0 | 0 | 0 |
| 0 | 4.000 | 10.000 | 13.000 | 0 | 0 | 0 |
| 5.000 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| | | | | | | |
| 0 | 0 | 10.000 | 15.000 | 25.000 | 0 | 0 |
| -100 | -100 | -100 | -100 | -100 | -100 | -100 |
| 5.500 | 5.500 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 3.500 | 5.000 |
| | | | | | | |
| 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| | | | | | | |
| 35.000 | 35.000 | 50.000 | 50.000 | 50.000 | 50.000 | 50.000 |
| | | | | | | |
| **132.900** | **205.900** | **243.400** | **237.900** | **261.400** | **227.400** | **255.400** |
| | | | | | | |
| **299.900** | **299.850** | **299.450** | **299.650** | **299.900** | **299.950** | **300.000** |
| *113* | *113* | *113* | *113* | *113* | *113* | *113* |